JAVNAÐAR
FLOKKURIN
**á Fólkatingi**

# SJÁLVRÆÐI Í FELAGSSKAPI

## EIN SJÁLVSTØÐUG TJÓÐ Í DAGFØRDUM SAMSTARVI

**Soleiðis verða Føroyar sterkari á altjóða pallinum – í sáttmála við Danmark**



JAVNAÐAR
FLOKKURIN
**á Fólkatingi**

**Frágreiðing frá Javnaðarflokkinum á Fólkatingi.**

Ábyrgd: Benny Ernstsson Lervig og Sjúrður Skaale.

Skrivað: Pætur Hjalmar Evensson, Ragnar Sjúrðarson,
Bartal Súsonnuson Hansen, Hansa Hansen og
Benny Ernstsson Lervig.

**Mai** 2026



# INNI-HALD

Fororð . . . . . . 10

Inngangur: Harmonikan er spent á tamb . . . . . . 12

Samanbering: Verandi skipan & nýggja skipanin . . . . . . 14

Søgulig gongd . . . . . . 16

Støðan í dag . . . . . . 20

Nýggi felagsskapurin . . . . . . 24

Øvug delegatión . . . . . . 30

Nýggir møguleikar á altjóða pallinum . . . . . . 34

Verandi skipanir og rættindi halda fram . . . . . . 46

Búskapur . . . . . . 52

Ítøkilig fremjan . . . . . . 58

Samandráttur . . . . . . 60

Keldur . . . . . . 63

# STYTT-INGAR

Týdningur av heitum

| | | |
|---|---|---|
| **Artiska Ráðið** | **Artiska Ráðið** | Millumstjóðasamstarv um arktisk viðurskifti |
| **DFG** | **Danmark, Føroyar og Grønland** | Heiti hjá Danmark, Føroyum og Grønlandi í altjóða høpi |
| **EBS** | **Evropeiska Búskaparliga Samstarvsøkið** | Fríhandilssamstarv í Europa (á donskum: EØS) |
| **EBU** | **European Broadcasting Union** | Evropeisk samgonga fyri public service sjónvarps- og útvarpsstøðir |
| **EF** | **Det Europæiske Fællesskab** | Felagsskapurin áðrenn hann bleiv til Europeiska Samveldið (ES) |
| **EFTA** | **European Free Trade Association** | Evropeiska Fríhandilssambandið |
| **ES** | **Evropeiska Samveldið (EU)** | Evropeiska Samveldið |
| **FAO** | **Food and Agriculture Organization** | Matvøru- og landbúnaðarfelagsskapurin |
| **Helsingfors-avtalan** | **Helsingforsavtalan** | Formliga grundarlagið fyri norðurlandasamstarvið |

| | | |
|---|---|---|
| **IBRD** | **International Bank for Reconstruction and Development** | Heimsbankin |
| **IMF** | **International Monetary Fund** | Millumtjóða gjaldoyragrunnurin |
| **IMO** | **International Maritime Organization** | ST-felagsskapur um altjóða sjóferðslu |
| **IOC** | **International Olympic Committee** | Altjóða nevndin fyri olympisk ítrottasambond |
| **ITU** | **International Telecommunication Union** | Millumtjóða fjarskiftissambandið |
| **NAFO** | **Northwest Atlantic Fisheries Organizaqtion** | Millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingsparti av Atlantshavinum |
| **NAMMCO** | **North Atlantic Marine Mammal Commission** | Havsúgdjóranevndin fyri Norðuratlantshav |
| **NASCO** | **North Atlantic Salmon Conservation Organization** | Millumtjóða felagsskapur fyri umsting av laksafiskiskapi í Norðuratlantshavinum |
| **NATO** | **North Atlantic Treaty Organization** | Verjusamgonga millum lond í Vesturevropa og Norðuramerika |

| | | |
|---|---|---|
| **NEAFC** | North East Atlantic Fisheries Commission | Millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í landnyrðingspari av Atlantshavinum |
| **Norðurlanda-ráðið** | Norðurlandaráðið | Millumtjóðasamstarv millum fólkavaldu tingini í norðurlondum |
| **Norðurlendska Ráðharraráðið** | Norðurlendska Ráðharraráðið | Millumtjóðasamstarv millum norðurlendsku stjórnirnar |
| **SPRFMO** | South Pacific Regional Fisheries Management Organisation | Millum fiskiveiðufelagsskapur fyri fiskiskap í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum |
| **ST** | Sameindu Tjóðir | Á donskum: De Forenede Nationer / FN |
| **UNESCO** | United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization | Mentamálafelagsskapurin |
| **WHO** | World Health Organization | Heimsheilsufelagsskapurin |
| **WTO** | World Trade Organization | Heimshandilsstovnurin |



# Felagsskapur og sjálvræði nýtast ikki at vera mótsetningar

**Ríkisrættarligi spurningurin hevur næstan ikki verið á skránni í føroyskum politikki í mong ár. Men ein breið semja millum allar flokkar uttan ein um nakrar yvirskipaðar grundreglur hevur gjørt, at málið aftur er á dagsskránni.**

Hetta rit er í samráð við leiðslu Javnaðarfloksins gjørt við atliti at hesi semju. Staðið fyri arbeiðinum hava Benny Lervig, Pætur H. Evensson, Ragnar Sjúrðarson, Bartal S. Hansen, Hansa Hansen og eg sjálvur.

Ritið er gjørt, tí tað eyðsæð eisini er viðkomandi fyri Fólkatingið at allir føroysku flokkarnir uttan ein taka undir við grundreglunum um ein ríkjafelagsskap. Tað varð skrivað áðrenn síðsta løgtingsval tá tað sá út til, at hetta eisini kundi gerast málið hjá einum komandi landsstýrið. Nú Sambandsflokkurin er partur av landsstýrinum verður tað neyvan júst hetta, sum verður málið komandi árini – men málið er kortini ein nýggjur felagsskapur, sum gevur Føroyum størri heimildir.

Eg havi gjøgnum árini brúkt nógva orku til at umrøða hesi viðurskifti, og mín greiða hugsan er, at tað onga meining gevur at brúka tíð uppá at broyta tey uttan so, at ein greiður og varandi meiriluti stendur aftanfyri hetta ynskið. Tað ber ikki til at fremja stórar broytingar við einum smølum og skinklandi meiriluta. Hinvegin er eingin ivi um, at stórar og gagnligar broytingar kunnu gerast, um meirilutin er stórur og varandi. Tí er harmiligt, at tann eini flokkurin ikki tekur undir við tí leisti, sum verður lýstur her. Gjørdi hann tað, hevði helst borið til at framt hetta í góðum samstarvi við Danmark komandi árini. Nú fáa vit at síggja, um tað eydnast at fáa Føroyum størri uttanríkispolitiskt rásarúm og – fyrst og fremst – betri marknaðaratgongd komandi árini uttan at fremja tær broytingar, sum her verða lýstar. Tað ger tað vónandi. Hinvegin: Eydnast tað ikki, verður hesin leisturin møguliga aktuellur aftur um nøkur fá ár.

Fyri Javnaðarflokkin hava broytingar í ríkisrættarligu støðuni ikki eitt ideologiskt, men eitt praktiskt mál. Tað snýr seg um at fáa nakrar møguleikar, Føroyar ikki hava í dag. Fyrst og fremst møguleikar fyri betri, smidligari og støðufastari atgongd til marknaðir - serliga evropeiska marknaðin.

Tann "øvuta delegatiónin", sum hevur verið umrødd, og sum vit eisini vísa til her, er ein møguleiki fyri semju millum loysingarvongin og sambandsvongin, sum øll áttu at kunna liva við.

Hugsanin er, at vit yvirtaka øll málsøki, og síðani delegerað nøkur av teimum til Danmarkar at umsita. Hesi eru – næstan – somu málsøki, sum Danmark nú umsitur okkara vegna.

Í veruleikanum er lítil munur, men formliga er stórur munur, tí felagsskapurin verður millum tvey formliga javnsett lond heldur heldur enn millum ein stat og eitt heimastýri. Tað er hetta, sum gevur okkum ta atgongdina til altóða samstarv, sum okkum tørvar.

Í Føroyum mugu báðir partar í ríkisrættarliga spurninginum geva seg – men báðir partar fáa eisini.

Sambandsvongurin fær á tann hátt, at føroyingar fyri fyrstu ferð nakrantíð á fólkaatkvøðu týðuliga og beinleiðis knýta seg tætt at Danmark á heilt grundleggjandi økjum og í veruleikanum geva seg undir danskar myndugleikar á hesum somu økjum so leingi, tann nýggi sáttmálin er galdandi.

Loysingarvongurin fær á tann hátt, at hann nær sínum stóra máli um, at Føroyar formliga verða skipaðar sum ein sjálvstøðugur statur.

Hvussu leingi sáttmálin, sum ásetir, at Danmark skal umsita stór málsøki Føroya vegna, skal vera galdandi áðrenn samráðast skal um hann av nýggjum, verður sjálvandi eitt stríðsmál. Men eitt er púra greitt: Tann nýggja skipanin krevur sera stóra væl-

vild úr Danmark. Og ein fortreyt fyri hesi vælvild er uttan iva, at áramálið ið hvussu er verður heilt nógv áratíggju. Kann ein breiður meiriluti í Føroyum ikki góðtaka tað, kemur hetta ikki á mál.

Tað merkir ikki, at ein føroyskur statur ikki kann skipast – í teoriini. Men tað merkir, at tað neyvan hendir í veruleikanum.

Vónandi duga allir partar at síggja, at skal tað vera alt ella einki, verður tað einki.

Vónandi duga allir partar eisini at síggja, at vit mugu taka atlit til ta truplu støðu, ríkið er sett í av ynskjunum hjá amerikansku stjórnini um at yvirtaka Grønland. Tað gagnar ongum – og als ikki málinum um at fáa ein nýggjan felagsskap millum Føroyar og Danmark – um vit tveita brennið á tað bálið. Vit eiga at arbeiða við hesum málinum innlendis, men bíða við at taka tað upp við Danmark, til geopolitiska støðan verður minni spent.



**Sjúrður Skaale**
fólkatingsmaður



# INN-GANGUR

## Harmonikan er spent á tamb

Síðan heimastýrislógin kom í gildi í 1948, hava føroyingar stigvíst tikið meira og meira politiska ábyrgd, yvirtikið málsøki eftir málsøki, og vunnið alsamt størri sjálvræði.

Skipanin millum londini í ríkisfelagsskapinum er stundum skýrd stirvin og ótíðarhóskandi, og stundum samanborin við eina smidliga harmoniku, sum kann víðkast ella avmarkast eftir tørvi. Helst tí, at hóast embætisverk og løgfrøði hava sett sínar avmarkingar, er tað altíð eydnast at finna loysnir á politiskum stigi.

Nýggjasta dømið er málið um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í World Trade Organization (WTO). Løgfrøðiliga metingin í Danmark sýtti fyri limaskapi, hóast politisk undirtøka var fyri tí. At enda metti Hægstirættur, at upprunaliga løgfrøðiliga metingin var skeiv. Føroyar kunnu søkja um WTO-limaskap.

Enn spælir harmonikan góðar tónar.

Men avgerðin hjá Hægstarætti ger eisini púra greitt, at nú er komið at mørkum. Staðfest er, at Føroyar skulu skipast sum sjálvstøðug tjóð

## Enn spælir harmonikan góðar tónar.

fyri at kunna fáa fleiri uttanríkispolitiskar møguleikar, og tær kunnu ikki gerast sjálvstøðugur limur í altjóða felagsskapum fyri sjálvstøðug lond, tí hetta ikki er sambæriligt við ríkisrættarligu støðu Føroya.

Sjálvstøðugur limaskapur í altjóða sjófeingisfelagsskapum sum NEAFC, NASCO og NAFO er tí ikki møguligur. Føroyar kunnu heldur ikki gerast limur í altjóða olympisku nevndini IOC, ið krevst fyri at fáa sjálvstøðuga føroyska umboðan á Olympisku Leikunum. Á vinnu- og búskaparøkinum eru líknandi avbjóðingar, tí har er trupult at fáa limaskap í handilssamgongum sum EFTA. Samstundis megna Føroyar ikki at fáa handilsavtalur í lag, millum annað tí summi lond himprast við at gera avtalur við lond, ið ikki eru sjálvstøðugir statir. Karmarnir í verandi skipan millum Føroyar og Danmark eru sostatt vorðnir ov trongir.

Harmonikan er spent á tamb, og loysnin er ein dagføring av ríkisrættarligu støðu Føroya. Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevur tí gjørt hetta íkastið til kjakið um, hvussu ríkisfelagsskapurin kann dagførast. Tað er sjálvsagt gjørt í samráð við leiðslu floksins. Harumframt hevur fyrrverandi professari í fólkarætti, Ole Spiermann, ráðgivið í løgfrøðiligu og serliga ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Ríkisrættarliga støða Føroya er staðfest í heimastýrislógini og í yvirtøkulógini, ið báðar hava heimild í donsku grundlógini. Tó nevnir grundlógin nærum ikki Føroyar, men lýsir danska ríkið sum ein eindarstat við einum parlamenti og einari stjórn. Hóast hetta hava Føroyar egið ting, egna stjórn og egnar myndugleikar. Tískil er ein umskipan av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark í størstan mun ein dagføring, ið staðfestir verandi støðu, tí í flestu førum er talan um at formfesta rættindi, ið longu eru vunnin.

Hetta uppskotið leggur upp til at dagføra ríkisfelagsskapin, soleiðis at Føroyar gerast ein sjálvstøðug tjóð í felagsskapi við Danmark – skipanin kallast frælsur felagsskapur. Endamálið er at tryggja Føroyum fleiri uttanríkispolitiskar heimildir.

Hetta snýr seg ikki um ideologiskar markeringar, men pragmatiskar loysnir – og tær kunnu fáast í einum nýggjum, dagførdum felagsskapi við Danmark.

# **Samanbering:** Verandi skipan & nýggja skipanin

Skipanin millum Føroyar og Danmark er skipað soleiðis, at Føroyar hava yvirtikið flestu málsøkini og hava fullan ræðisrætt á hesum. Nøkur málsøki eru framvegis felagsmál, sum í flestu førum kunnu yvirtakast, um politiskur vilji er til staðar í Føroyum. Tó eru summi felagsmál, sum ikki kunnu yvirtakast undir verandi ríkisrættarligu støðu.

## Verandi skipan

| Fylgjandi málsøki kunnu yvirtakast: | Hesi øki kunnu ikki yvirtakast: |
|---|---|
| **Rættarøkið, politi, kriminalforsorg, útlendingaøkið og marknaeftirlit, fíggjarøkið og loftferðsluøkið.** | **Hægstirættur, uttanríkis-, trygdar- og verjuøkið, gjaldoyra- og peningapolitikkur, grundlógin og ríkisborgararættur.** |

## Nýggja skipanin

| Fylgjandi málsøki kunnu yvirtakast í sáttmálaskeiðnum: | Hesi øki kunnu ikki yvirtakast í sáttmálaskeiðnum: |
|---|---|
| **Rættarøkið, politi, kriminalforsorg, útlendingaøkið og marknaeftirlit, fíggjarøkið, loftferðsluøkið og uttanríkispolitikkur**<br><br>Hetta er sama støða sum nú, men uttanríkisøkið verður yvirtikið frá byrjan. | **Hægstirættur, trygdar- og verjuøkið, og gjaldoyra- og peningapolitikkur**<br><br>Hetta er sama støða sum nú. Harumframt skulu og kunnu grundlóg og ríkisborgararættur ikki yvirtakast, tí Føroyar fáa egnar skipanir. |

## Broyting

- Skipanin byggir á sáttmála millum Føroyar og Danmark heldur enn á danskar og føroyskar lógir.
- Føroyar fáa størri heimildir á uttanríkisøkinum.



# **Søgulig** gongd

Heimastýrislógin fyri Føroyar varð samtykt á Fólkatingi og Løgtingi og sett í gildi 1. apríl 1948. Í lógini er ein listi yvir øll øki, sum Føroyar kunnu yvirtaka. Á lista A standa tey øki, sum Føroyar kunnu yvirtaka beinanvegin uttan samráðing og viðtøku í Danmark, meðan væl styttri listi B inniber tey øki, sum Føroyar kunnu fara til samráðingar við danir um at yvirtaka, áðrenn endalig støða verður tikin til spurningin „um og í hvørji vídd“, tey kunna verða viðurkend sum sermál.[1]

Inngangurin í heimastýrislógini, sum hevur sín uppruna í íslendsku stjórnarskipanarlógini frá 1874, viðurkennir tjóðskaparligu, søguligu og landafrøðiligu serstøðu Føroya innan danska ríkið.[2]

Við støði í hesum inngangi og sum úrslit av menningini síðani seinna heimsbardaga er henda serstøða vorðin uppaftur meira eyðsýnd – serliga tá tað snýr seg um politisku viðurskiftini við útheimin, har Føroyar og Danmark í fleiri førum hava valt ymiskar leiðir.

Sum dømi kann nevnast, at Føroyar eru limur í Havsúgdjóranevndini fyri Norðuratlantshav (NAMMCO), har Danmark ikki er limur; at londini hava gjørt hvør sínar avtalur á fleiri økjum; og at danski limaskapurin í Evropeiska Samveldinum (ES) ikki fevnir um Føroyar.

Eitt tað greiðasta dømi um, at Føroyar og Danmark hava valt hvør sína leið, er makrelstríðið. ES, og harvið eisini Danmark sum limaland, setti handilsboykott í verk móti Føroyum vegna ósemjur um fiskirættindi í 2013. Boykottið fevndi millum annað um innflutning av makreli og sild, og gjørdi støðuna millum partarnar spenta. Hendingin var eitt greitt dømi um, hvussu Føroyar, hóast ríkisfelagsskapin við Danmark, virka sum sjálvstøðugur aktørur í altjóða høpi, tá tað snýr seg um vinnu og sjófeingi. Í grundgevingini hjá ES fyri boykottið stóð, at Føroyar ikki hildu sínar ”fólkarættarligu skyldur”. Av tí at tað einans eru statir, ið hava slíkar skyldur, viðurkendi henda grundgevingin, at Danmark og Føroyar í hesum máli ikki vóru at rokna sum ein og sami statur.[3]

# Týðandi ríkisrættarlig fet eftir heimastýrislógina

## 1.

### Danmark í EF – Føroyar uttanfyri

Í 1972 skipaði danska stjórnin fyri fólkaatkvøðu um limaskap í Evropeiska Felagsskapinum (EF, nú ES). Danmark atkvøddi við greiðum meiriluta fyri limaskapi, og 1. januar 1973 gjørdist Danmark limur í EF.

Føroyar høvdu eina aðra støðu. Sambært heimastýrislógini høvdu Føroyar fullar heimildir á vinnulívsøkinum. Fiskivinnan hevði avgerandi týdning fyri føroyska búskapin, og tað var greitt, at felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES kundi fáa avleiðingar fyri føroyskt vinnulív. Politiskt var eisini breið semja um, at evropeiskir stovnar ikki skuldu hava ræði á føroyskum fiskigrunnum.

Danmark og EF komu tí fram til eina loysn, har Føroyar, sum landafrøðiligt og vinnuligt øki, vórðu undantiknar limaskapinum.[4] Hetta gjørdist fyrsta stóra dømið um eina veruliga skilnaðarlinju millum Danmark og Føroyar í altjóða høpi eftir at heimastýrislógin varð sett í gildi.

Hendan avgerðin fekk við tíðini stóran týdning fyri politisku hugsjónirnar um framtíðar ríkisrættarligu støðu Føroya.

## 2.

### Yvirtøka av ráevnum í undirgrundini

Í 1977 vóru ríkisrættarligu karmarnir aftur vorðnir ov trongir, og Løgtingið samtykti, at føroyska undirgrundin skuldi yvirtakast, men hetta vildi danska stjórnin ikki.

Hin 18. februar í 1982 fekk Føroya Landsstýri í brævi frá danska forsætisráðharranum, Anker Jørgensen, boð um, at undirgrundin bert kundi blíva føroyskt serøki um Føroyar fóru úr ríkinum.

Eftirmaðurin hjá Jørgensen, Poul Schlüter, var tó fúsari at gera eina avtalu, og 11. septembur 1992 yvirtóku Føroyar ráevni í undirgrundini. Tað, ið við tilvísing til grundlógina, hevði verið ómøguligt, bar nú brádliga til.

Schlüter hevur síðani sagt, at: “**Avgerðin var ikki grundað á løgfrøði, men á politiska og filosofiska umhugsan. Hetta var ein donsk vinargerð, sum var natúrlig og í samsvari við modernaðu tíðina**”.[5]

Ræðið á undirgrundini á føroyska landgrunninum, lóggávan um leitiskipan, og loyvir og skattlegging av orkuvinnu varð flutt til føroyskar myndugleikar.

Yvirtøkan hevði stóran politiskan týdning, og var eitt tekin um veruligt sjálvræði innan ríkisfelagsskapin.

# 3.

## Uttanríkispolitiska lógin

Í 2005 varð uttanríkispolitiska heimildarlógin sett í gildi í Føroyum. Endamálið var at sleppa undan, at danska uttanríkisráðið í hvørjum føri skuldi taka støðu til, um Føroyar kundu fáa samráðingarheimild, og at danska uttanríkistænastan skuldi luttaka í samráðingum. Hetta gjørdi tilgongdina bæði stirvna og tunga.

Við uttanríkispolitisku lógini varð henda treyt strikað. Føroyska uttanríkistænastan hevur síðani kunnað samstarvað beinleiðis við altjóða myndugleikar – eisini í løgfrøðiliga bindandi skrivligum samskifti.

Lógarteksturin gevur eisini Føroyum møguleika at samráðast sjálvstøðugt í yvirtiknum málsøkjum uttan fulltrú úr Keypmannahavn.[6]

Hóast uttanríkispolitiska heimildarlógin skuldi vera við til at styrkja støðu Føroya á altjóða pallinum, hevur hon ikki einans havt jaliga ávirkan. Seinastu 20 árini hava nevniliga víst, at lógin í fleiri førum hevur havt minst líka nógvar avmarkingar sum heimildir. Hetta verður lýst í komandi brotinum, á síðu 20.

# 4.

## Yvirtøkulógin

Við heimastýrislógini fingu Føroyar rætt at yvirtaka ymisk málsøki, men tað vísti seg, at skipanin var tálmandi og ógreið. Ofta tók tað langa tíð at semjast um, hvørji øki skuldu yvirtakast, og hvussu hetta skuldi fremjast í verki.

Tí varð ein nýggj yvirtøkulóg sett í gildi í 2005, sum skuldi gera tilgongdina greiðari og meira sjálvvirkandi. Yvirtøkulógin staðfestir, at Føroyar, við nøkrum undantøkum, kunnu yvirtaka flestu málsøki, tá føroyingar vilja tað.[7]

Áðrenn yvirtøkulógina vóru ásetingarnar í heimastýrislógini galdandi, sum staðfesta, at málsøkini bert kunnu yvirtakast, um Danmark loyvir tí.

# 5.

## Yvirtøkan av fólkakirkjuni

Tá politiska og átrúnaðarliga valdið í Føroyum savnaðust á ólavsøku í 2007, var tað á fyrsta sinni í eini kirkju undir føroyskum ræði.

Stutt eftir, at heimastýrislógin kom í gildi, yvirtóku Føroyar nærum øll mentanarmál – tó ikki fólkakirkjuna.

Ein týðandi orsøk var, at fólkakirkjan er lýst í donsku grundlógini. Tískil er fólkakirkjan ein sameindur partur av donsku statsskipanini og kann ikki yvirtakast uttan serligar politiskar og rættarligar avtalur, sum tryggja, at grundlógin verður hildin.

Føroyska kirkjan var tí formliga ein partur av donsku kirkjuskipanini fram til 2007, hóast hon í verki hevði føroyska siðvenju og føroyskar reglur.

Yvirtøkan av fólkakirkjuni var eitt mál, ið bjóðaði ríkisskipanini av. Hon kravdi semju millum føroyskar og danskar myndugleikar um, hvussu ein stovnur, sum grundlógin verjir, kundi latast eini sjálvstøðugari føroyskari kirkjuskipan.

Yvirtøkan var tí eitt stórt sjálvstýrisstig, ikki bert fyri kirkjuna, men fyri føroysku politisku skipanina sum heild

# **Støðan** í dag

**Føroyar eru mentar nógv undir heimasstýrisskipanini. Ikki bert innlendis, men eisini tá tað snýr seg um heimildir á altjóða pallinum. Tó eru fleiri avmarkingar, ið forða fyri sjálvstøðugum – og neyðugum – føroyskum uttanríkispolitikki.**

Hóast uttanríkismál formliga eru danskt málsøki, hava Føroyar, sum nevnt, lutfalsliga víðar heimildir, ið loyva føroyingum at røkja egin uttanríkispolitisk áhugamál. Heimildirnar eru fyrst og fremst ásettar í heimastýrislógini, men eru í ein ávísan mun víðkaðar í uttanríkispolitisku heimildarlógini.

Heimildarlógin gevur Føroyum heimild at gerast limir í altjóða felagsskapum og at samráðast við aðrar tjóðir um **yvirtikin** málsøki. Treytin er, at avtalurnar ikki fevna um Grønland, og at tær heldur ikki skulu galda fyri Danmark ella verða gjørdar við ein felagsskap, sum Danmark er limur í frammanundan.

Á teimum økjum, uttanríkispolitiska heimildarlógin heimilar Føroyum at umboða seg sjálvar altjóða, er tað tó ikki undir egnum navni sum "Føroyar". Formligi samleiki Føroya í altjóða felagsskapum er "**Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne**". Hetta er tí, at danska ríkið formliga er eitt eindarríki, og tískil luttaka Føroyar, Grønland og Danmark undir heitinum Kongsríkið Danmark í altjóða høpi. Hetta kemur eisini til sjóndar í grundlógini, ið staðfestir, at "**Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender**". Formliga merkir hetta, at uttanríkispolitikkur verður førdur av Danmark. Men við orðingini "**Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne**" loyvir mann einum parti av ríkinum at hava sjálvstøðuga altjóða umboðan.

Uttanríkispolitiska heimildarlógin hevur til endamáls at geva Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir, men hon verjir eisini suverenitetin hjá kongsríkinum sum eina eind. Við øðrum orðum: Eindarstaturin verður í grundregluni ikki skalaður. Hetta kemur til sjóndar í grein 2 í lógini, ið krevur tætt samstarv millum landsstýrið og donsku stjórnina til tess, at heildaráhugamál hjá

Skipanin skapar óneyðugar ósemjur og er eitt dømi um, at verandi ríkisrættarliga støða forðar fyri sjálvstøðugum føroyskum uttanríkispolitikki í praksis.

Danmark ikki verða sett til viks. Danska stjórnin skal kunnast um ætlaðar samráðingar og samráðingargongdir, áðrenn altjóðarættarligir sáttmálar verða gjørdir ella sagdir úr gildi. Her avmarkar greinin uttanríkispolitisku heimildirnar hjá Føroyum til at halda seg innanfyri áhugamálini hjá Danmark og gevur dønum rættin at lýsa, hvat er innan og uttan fyri teirra áhugamál.

Eitt annað dømi um eina avmarking í heimildarlógini er innan altjóðarættarliga sáttmálar, sum viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi. Tí her kunnu Føroyar ikki luttaka og samráðast einsamallar. Í staðin skulu Føroyar luttaka saman við Grønlandi undir heitinum ”Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne og Grønland”. Hetta verður kallað DFG-skipanin, og hon hevur til endamáls at geva Føroyum og Grønlandi møguleika at virka í felag í altjóða málum.

Tað hevur við sær, at londini bæði bert hava eina felags atkvøðu í teimum felagsskapum, har tey luttaka umvegis DFG-skipanina. Føroyar og Grønland mugu sostatt vera á einum máli um, hvussu atkvøðast skal, tá avgerðir skulu takast um eitt nú fiskiskap. Trupulleikin við hesum er, at londini ikki altíð hava somu áhugamál. Um bert annað landið hevur ítøkilig áhugamál, avger hetta landið, hvussu atkvøðast skal. Og tá áhugamálini ikki samsvara, verður ikki atkvøtt, og harvið verða Føroyar og Grønland uttanfyri ávirkan. Hendan skipanin skapar óneyðugar ósemjur og er eitt dømi um, at verandi ríkisrættarliga støða forðar fyri sjálvstøðugum føroyskum uttanríkis-politikki í praksis – hóast heimildirnar í prinsippinum eru víðar.

Hóast rættarstøða sum statur ikki merkir, at Føroyar frá degi til dags verða sjálvstøðugur limur í alskyns altjóða felagsskapum, so hvørva nakrar grundleggjandi forðingar.

## Avmarkaðir møguleikar í altjóða felagsskapum

Innan verandi ríkisrættarligu karmar luttaka Føroyar í altjóða samstarvi upp á fleiri ymiskar mátar. Føroyar hava fleiri avtalur, sum einans eru millum Føroyar og onnur lond, og sum ikki viðkoma Danmark ella Grønlandi. Harvið eru Føroyar sjálvstøðugur avtalupartur í altjóða avtalum.

Luttøkan hjá Føroyum í altjóða felagsskapum er treytað av teimum krøvum, ið ymsu felagsskapirnir hava til limaskap. Treytirnar fyri limaskapi eru ymiskar frá felagsskapi til felagsskap, men í øllum førum krevst, at staturin, sum umsitur uttanríkispolitikkin hjá sjálvstýrandi landspartinum, gevur sítt samtykki. Hetta kenna vit frá tá Føroyar gera fólkarættarligar avtalur undir heitinum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne", har luttøka ikki er avmarkað til statir.

Summir altjóða felagsskapir krevja, at limalond skulu vera sjálvstøðugir statir. Her kunnu Føroyar av góðum grundum ikki gerast sjálvstøðugur limur, men í summum førum ber til at fáa atlimaskap. Við atlimaskapinum fylgja at kalla somu rættindi og skyldur, sum fullgildur limaskapur gevur. Føroyar hava atlimaskap í fleiri altjóða felagsskapum – millum annað ST-felagsskapum. Her hava Føroyar rætt til at luttaka á fundum, men hava ikki atkvøðurætt. Sjálvt um hesin atkvøðurætturin ikki altíð hevur so stóran týdning fyri Føroyar, er tað ein sannroynd, at mann sum atlimur ikki luttekur á jøvnum føti við lond, sum hava fullan limaskap.

## Broyting er neyðug, og lagaliga løtan er nú

Tað hevur í nógv ár verið eitt politiskt ynski hjá skiftandi samgongum at betra um uttanríkispolitisku møguleikarnar hjá Føroyum. Tað er sjón fyri søgn, at

karmarnir í ríkisfelagsskapinum eru vorðnir ov trongir, og at neyðugt er at finna pragmatiskar loysnir.

Danska stjórnin hevur fleiri ferðir sagt seg vilja nútímansgera DFG-skipanina og finna loysnir, sum víðka um uttanríkispolitiska rásarúmið hjá Føroyum. Danski forsætisráðharrin Mette Frederiksen nevndi sjálv í setanarrøðu síni á fólkatingi í 2023[8], at í framtíðini verður ríkisfelagsskapurin ein felagsskapur millum tríggjar javnbjóðis tjóðir, og í setanarrøðuni í 2025 vísti hon aftur á, at tørvur er á at broyta felagsskapin.[9]

Hetta uppskotið samsvarar við hugsanina um ríkisfelagsskapin sum tríggjar javnbjóðis tjóðir. Við loysnini at skipa Føroyar sum stat í tøttum felagsskapi við Danmark, slepst undan alskyns fólkarættarligum ivamálum og tvístøðum í ríkisfelagsskapinum, samstundis sum Føroyar kunnu røkja egin áhugamál. Føroyar fara til dømis at kunna søkja um limaskap í øllum altjóða felagsskapum, uttan at søkja umvegis Danmark. At søkja umvegis Danmark krevur bæði tíð og orku, sum til dømis WTO-málið vísti. Her tók tað nógv ár at fáa staðfest, at Føroyar kunnu søkja um limaskap.

Hóast rættarstøða sum statur ikki merkir, at Føroyar frá degi til dags verða sjálvstøðugur limur í alskyns altjóða felagsskapum, so hvørva nakrar grundleggjandi forðingar. Við hesum leisti verða allar fyritreytirnar fyri luttøku hjá Føroyum í altjóða samfelagnum sostatt broyttar til fyrimuns fyri Føroyar.

■

# **Nýggi** felagsskapurin

**Flestu føroysku flokkarnir eru samdir um, at tørvur er á eini skipan, ið víðkar møguleikarnar fyri altjóða limaskapum, tó framvegis í einum tøttum samstavi við danir um fleiri øki. Vælferðin skal ikki setast í vanda, og búskaparliga gongdin skal halda fram við stigvísum yvirtøkum av málsøkjum og niðurlagingum av blokkstuðlinum.**

Metingin hjá Javnaðarflokkinum er, at tann best møguliga ríkisrættarliga skipanin, ið kann ganga breiða politiska viljanum í Føroyum á møti, er at verða ein status í eini free association skipan við Danmark. T.e. eitt land, sum formliga er sjálvstøðugt, men er í tøttum felagsskapi við Danmark. Vit kunnu siga, at Føroyar fara frá einum ríkis- til ein ríkjafelagsskap við Danmark.

## Frælsir felagsskapir og líknandi skipanir

Hugtakið **free association** (frælsur felagsskapur ella ríkjafelagsskapur á føroyskum) hevur uppruna úr Sameindu Tjóðum (ST). Frælsur felagsskapur merkir, at eitt minni land vinnur sær altjóða viðurkenning sum sjálvstøðug tjóð, men samstundis ger eina avtalu um tætt samstarv og ávísar felags skipanir við eitt fyrrverandi koloniveldi ella eitt størri land. Fleiri smærri oyggjalond í Kyrrahavinum hava fingið slíkar skipanir í lag, og hesi dømi eru viðkomandi at samanbera við Føroyar.

### Marshalloyggjarnar, Mikronesia og Palau

Dømi um frælsar felagsskapir eru Marshalloyggjarnar, Mikronesia og Palau, sum Japan áður hevur umsitið. Eftir tapið hjá Japan í seinna veraldarbardaga í 1945 komu hesi undir eitt yvirvald hjá ST við heitinum Trust Territory of the Pacific Islands (TTPI).[10] Hóast ST formliga átti økið, varð USA valt sum umsitari. USA hevði harvið fult fyrisitingarligt og hernaðarligt vald yvir londunum og stóð fyri allari uppbygging av stovnum, undirstøðukervi, og bæði uttan- og innanríkispolitikki. Í 1979 samtyktu Marshalloyggjarnar og Mikronesia sjálvstýrislógir og londini blivu endaliga sjálvstøðug í 1986.[11] Fólkið í Palau fekk fleiri ferðir møguleika at atkvøða um, hvørt landið skuldi blíva sjálvstøðugt frá 1979 til 1993. Lógarkravið var, at tveir triðingar skuldu atkvøða fyri, og til endans eydnaðist tað teimum, ið vildu at Palau skuldi blíva ein status, at fáa kravda meirilutan.[12]

USA stuðlaði londunum í teirra tilgongd til at blíva sjálvstøðug og helt fram við at rinda teimum stuðul og umsita teir stovnar, sum londini ikki sjálvi megnaðu, við tí treyt, at tey undirskrivaðu eina Compact of Free Association

avtalu við USA. Avtalan merkir, at londini hava fult ræði á sínum innanríkisviðurskiftum og uttanríkispolitikki, men øll trý lata nøkur málsøkir til USA. Eisini fáa tey fíggjarligan stuðul, atgongd til ávís almenn amerikonsk tilboð og møguleika at ferðast til USA uttan visum. Avtalurnar eru tíðaravmarkaðar og kunnu sigast upp, annaðhvørt við semju millum báðar partar ella einsæris.[13] Tó verða ásetingarnar um verjumál framvegis í gildi í eitt ávíst áramál eftir uppsøgn. Í sáttmálanum við Palau er ein áseting, sum útilokar øllum hervaldi uttan tí amerikanska, og hon er galdandi í óavmarkaða tíð – ella til londini sínámillum semjast um at seta hana úr gildi.[14]

Sáttmálin tilskilar umframt hetta amerikonskum myndugleikum ávís rættindi og áleggur teimum skyldur á ymsum málsøkjum; eitt nú í uttanríkismálum, verjumálum, fjarskiftismálum og í málum viðvíkjandi útlendingaeftirliti, umhvørvisvernd, gjaldoyra og fíggjarligum stuðli.

Hesi trý londini blivu limir í ST beinanvegin aftaná tey blivu sjálstøðug frá USA, og tey eru í dag viðurkend sum sjálvstøðugar tjóðir í altjóða samfelagnum.[15]

## Cookoyggjarnar og Niue

Eitt annað dømi eru Cookoyggjarnar og Niue, sum bæði eru sjálvstýrandi lond í frælsum felagsskapi við Nýsæland. Avtalurnar millum londini og Nýsæland eru ymiskar, men felags er, at londini hava sjálvstøðugt ræði á øllum innanríkisviðurskiftum, meðan Nýsæland hevur ábyrgd av verjumálum og stórum pørtum av uttanríkismálum. Tey hava rætt at gera sáttmálar, tey eru viðurkend av fleiri londum bilateralt og luttaka undir egnum navni í fleiri ST-felagsskapum.[16] Tó eru londini ikki viðurkend sum sjálvstøðug av ST, fyrst og fremst tí tey ikki sjálvi eru farin undir tilgongdina at blíva statir.

Frælsur felagsskapur er ikki nóg mikið til ST-limaskap. Tað krevst eisini, at ST viðurkennir viðkomandi land sum stat. Tá henda viðurkenning ikki er til staðar – sum hjá Cookoyggjunum og Niue – kunnu tey ikki verða limir í ST, hóast tey hava víðfevnt sjálvstýri og avmarkaðan limaskap í øðrum altjóða felagsskapum. Limirnir í ST loyva ikki "non-state entities" at luttaka – tað eru bert PLO (Palestine Liberation Organization) og Vatikanríkið, sum hava fingið eygleiðarastøðu í ST.[17]

## Ný Kaledonia

Tað nýggjasta dømið um eitt land við avtalu um frælsan felagsskap er Ný Kaledonia. Í juli 2025 gjørdu Ný kaledonskir og franskir myndugleikar eina avtalu um, at Ný Kaledonia framvegis er franskt øki, men at landið fær heiti sum statur við heitinum „State of New Caledonia".[18]

Kyrrahavslandið hevur síðani 1998 havt eina serstaka stjórnarskipanarliga støðu sum collectivité sui generis innan franska ríkið. Økið hevur egið ting, stjórn og serligt „New Caledonian citizenship", men Frakland hevur framvegis fullan suverenitet innan økir sum t.d verjumál, gjaldoyra- og rættarskipan.

Tríggjar fólkaatkvøður vórðu hildnar millum 2018 og 2021, og í báðum teimum fyrstu atkvøddi ein meiriluti ímóti at fara úr franska ríkinum. Hin triðja varð boykottað av sjálvstýrisflokkunum.[19]

Nýggja avtalan gevur økinum størri innanríkisvald og møguleika fyri víðfevndum altjóða samskifti, men økið er framvegis ikki viðurkent sum sjálvstøðugt land í ST, tí Frakland varðveitir suverenitetin. Ný Kaledonia er sostatt ikki ein statur í eini free association skipan, men hetta er heldur ein nýggj innanhýsis stjórnarskipan undir fronskum "ríkisfelagsskapi".

## Føroyar í frælsum felagsskapi við Danmark

Sum sæst eru fleiri dømi um lond, ið hava tætt tilknýti til eitt størri ríki, men samstundis hava víðfevnt sjálvræði – bæði innanlands og í altjóða høpi. Teirra støður líkjast, men eru tó ymiskar.

Skipanin hjá Ný Kaledonia sum statur í franska ríkinum – við egnum ríkisborgaraskapi og møguleika fyri altjóða viðurkenning – er áhugaverd, og slík skipan kundi helst fingið undirtøku í Føroyum. Men hon røkkur ikki nóg langt. Uttan ST-viðurkenning sum sjálvstøðugt land fara Føroyar ikki at kunna virka á altjóða pallinum eftir egnum politiskum ætlanum.

Tí meta vit, at mest viðkomandi samanbering er tann, sum Marshalloyggjarnar, Mikronesia og Palau hava – og tey eru sjálvstøðug lond í frælsum felagsskapi – ella ríkjafelagsskapi – við eitt annað land.

## Leikluturin hjá ST og fólkarættarligi týdningurin

ST hevur havt ein týðandi leiklut í menningini av meginregluni um frælsan felagsskap, sum ein lóglig og viðurkend skipan í avkoloniseringsgongdum. Í samtykt nr. 1541 (XV) hjá ST-aðalfundinum frá 1960 varð staðfest, at ikki-sjálvstýrandi øki kunnu enda sína kolonialu støðu á tríggjar lógligar mátar. Økini kundu:

1. Vinna sær fulla óhefta sjálvstøðu
2. Verða sjálvboðið innlimað í eina verandi tjóð
3. Seta á stovn ein frælsan felagsskap við eina sjálvstøðuga tjóð, grundað á fólksins fría vilja.[20]

Treytirnar fyri, at ST kann viðurkenna eina skipan sum frælsan felagsskap, eru í høvuðsheitum tvær. Onnur er, at viðkomandi øki hevur óskerdan rætt til sjálvt at taka avgerð um síni innlendis stjórnarrættarligu viðurskifti uttan uppíblanding frá øðrum landi. Hetta forðar kortini ikki fyri, at tað í sáttmálanum um frælsan felagsskap kann verða ásett, at samráðingar skulu vera við størru tjóðina, áðrenn stjórnarrættarligar broytingar verða framdar.

Hin treytin er, at viðkomandi land hevur einsæran rætt til at broyta stjórnarrættarligu støðu sína so, at tað verður skipað sum ein statur.

Føroyar hava aldri verið eitt hjáland í ST-høpi og hava ongantíð staðið á ST-listanum yvir hjálond. Tó eru avgerðirnar hjá avkoloniserningsnevndini hjá ST viðkomandi fyri Føroyar. Sjálvsavgerðarætturin er ikki einans galdandi fyri fyrrverandi hjálond, men eisini fyri fólk, og føroyingar lúka allar treytir fyri at vera eitt fólk í rættarligum týdningi. Hetta ger meginreglurnar viðkomandi.

Tað merkir, at ein líknandi loysn fyri Føroyar – um hon byggir á fólksliga undirtøku og verður gjørd á sjálvbodnum og javnbjóðis grundarlagi – kundi fingið altjóða viðurkenning, sum ein lóglig fremjan av sjálvs-avgerðarrættinum.

# Fordømi

Í kjakinum um føroyskt sjálvstýri verða spurningar ofta settir við, um Føroyar kunnu hava fulla ábyrgd á økjum sum dómsvaldi, um okkara núverandi rættindi sum danskir ríkisborgarar kunnu varðveitast, og hvør støðan verður við fíggjarligu veitingunum úr Danmark. Tó eru altjóða fordømi, ið prógva at hesir spurningar kunnu loysast á ymiskan hátt, og at sjálvræði og frælsur felagsskapur kunnu skipast við stórum fleksibiliteti, bæði tá tað kemur til rættarligar og fíggjarligar spurningar. Í næstu brotunum verða nøkur slík fordømi løgd fram fyri at seta føroyska kjakið í eitt breiðari altjóða perspektiv.

## Fordømi um dómsvald

Sum støðan er nú, hava Føroyar onki sjálvstøðugt dómsvald. Fleiri vilja vera við, at eitt so lítið samfelag, sum tað føroyska, ikki kann hava eina fullkomiliga sjálvstøðuga rættarskipan orsakað av møguligum gegnistrupulleikum, og tí skulu Føroyar ikki loysa frá donsku grundlógini.

Tó finnast fleiri dømi úr Kyrrahavinum og Karibia, har fyrrverandi hjálond í dag eru sjálvstøðug ríki við egnari rættarskipan og hægstarætti, men kortini hava valt at varðveita møguleikan fyri, at endaligar kærur kunnu leggjast fyri Privy Council (dómstólin) í London.[21]

## Fordømi um ríkisborgararætt

Statir hava serligan myndugleika at avgera, hvør fær ríkisborgararætt. Hesin myndugleiki fevnir eisini um íbúgvar í teirra sjálvstýrandi ríkislutum, so at ríkisrætturin er felags innan sama land.

Tískil hava lond, sum ikki eru sjálvstøðug, men hava frælsan felagsskap við annað land – so sum Niue og Cookoyggjar, har íbúgvarnir eru nýsælendskir ríkisborgarar – ikki limaskap í ST.

Hinvegin hava sjálvstøðug lond sum Mikronesia og Marshalloyggjarnar, ið eisini eru í frælsum felagsskapi, sjálvstøðugan og óheftan ríkisborgararætt og eru limir í ST.

Ymiskur ríkisborgararættur merkir tó ikki, at munur verður gjørdur á íbúgvum. Fleiri dømi eru um, at ávísir fremmandir ríkisborgarar verða viðfarnir eins og heimligu ríkisborgararnir. Í Bretlandi hava íbúgvar úr Írlandi og londum í Commonwealth, sum eru búsettir í Bretlandi, leingi havt bæði valrætt og valbæri.[22] Vaksandi samstarvið í ES hevur eisini prógvað, at vantandi ríkisborgararættur

í einum landi ikki er ein forðing fyri, at fólk frítt kunnu ferðast millum limalond. Í Compact of Free Association-sáttmálunum hjá Marshalloyggjunum, Mikronesia og Palau við USA stendur, at hesir ríkisborgararnir hava ein serligan rætt at búgva, arbeiða og lesa í USA uttan visum og at gera sjálvbodna tænastu í amerikanska herinum.[23]

## Fordømi um fíggjarliga veiting

Spurningurin um ríkisstuðulin fyllir framvegis nógv, tá kjakast verður um støðuna hjá Føroyum í danska kongaríkinum. Sjálvstýri verður ofta sett í samband við at fíggja egið samfelag við einans egnum skattakrónum. Hetta er tó ikki ein áskoðan, sum er alment ella altjóða galdandi.

Hóast áðurnevndu londini Marsalloyggjarnar, Mikronesia og Palau hava verið sjálvstøðugar og viðurkendar tjóðir í ávíkavist 40 og 32 ár, rindar USA framhaldandi eitt so-nevnt COFA-gjald til londini. COFA stendur fyri Compact of Free Association og kann samanberast við ríkisstuðul. Marshalloyggjarnar og Mikronesia endurnýggjaðu sínar avtalur í 2023 og Palau í 2024. Avtalurnar eru galdandi fyri komandi 20 árini. Marshalloyggjarnar fáa umleið 15,6 milliardir danskar krónur, Mikronesia fær umleið 22,4 milliardir danskar krónur og Palau fær umleið 5,7 milliardir danskar krónur tilsamans komandi 20 árini. COFA-gjaldið verður m.a. nýtt til infrakervi, heilsu, útbúgving og umhvørvi. Afturat hesum vórðu umleið 4,3 milliardir danskar krónur játtaðar til amerikanska postverkið í hesum londunum.[24]

Amerikanska stjórnin tykist ikki at meta, at hesi gjøldini eru spill av peningi, hóast hon ikki longur hevur fyrisitingarligt vald á londunum, eins og áðrenn avtalurnar um frælsan felagsskap vórðu gjørdar.

Í fyrsta árinum undir aðru Trump-stjórnini, var eitt av høvuðsmálunum at skera almennu útreiðslurnar. Dagsskráin "America First" leggur dent á, at amerikanskir skattgjaldarar fyrst og fremst skulu rinda fyri amerikonsk endamál. Tí er tað áhugavert, at meðan veitingarnar til menningarhjálp kring heimin verða minkaðar nógv, hevur tað aldrin verið upp á tal at strika ella minka um veitingarnar til Marshalloyggjarnar, Mikronesia og Palau – hóast tær ikki geva beinleiðis amerikanskt stjórnarvald afturfyri.

Dømið við Marshalloyggjunum, Mikronesia og Palau vísir, at fíggjarligar veitingar ikki av sær sjálvum eru treytaðar av fyrisitingarligum valdi ella manglandi sjálvstøðu. Tí eigur spurningurin um ríkisveiting – bæði rættarliga og politiskt – at verða skiltur í breiðari søguligum og politiskum samanhangi.



# **Øvug** delegatión

**Ein ríkjafelagsskapur staðfestir ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmark og virkar sostatt sum ein karmur um dagførdan felagsskap millum londini. Hvussu føroyingar ítøkiliga skipa seg innan hesar karmar skal politiska skipanin semjast um innanhýsis, og síðani skal ein avtala gerast við danir. Okkara uppskot er, at næsta ríkisrættarliga fetið verður tikið við øvugari delegatión.**

## Ríkisfelagsskapurin vendast á høvdið

Delegatión, ella avhendan, merkir, at ein statur ella ein hægri myndugleiki letur (útdelegerar) rættin at taka avgerðir ella at útinna myndugleika innan eitt ávíst málsøki til ein annan myndugleika – til dømis eitt land, eitt øki ella eina kommunu.

Við øvugari delegatión verður sipað til, at Føroyar í eini nýggjari skipan við Danmark yvirtaka øll málsøki og síðani lata ábyrgdina av ávísum økjum aftur til danir at umsita. Skipanin kann sigast at vera vend á høvdið, samanborið við núverandi skipan millum londini – á henda hátt er delegatiónin øvug.

Hesi viðurskifti skulu skipast í einum sáttmála millum Føroyar og Danmark. Eins og ávíst, eru fleiri dømi um lond, ið hava sáttmálar um tætt samstarv og ávísar felags skipanir, við eina størri tjóð. Felagsskapurin millum Føroyar og Danmark skal á líknandi hátt byggja á ein langtíðarsáttmála, ið skal lýsa nýggja samstarvið millum londini og harumframt áseta býtið og treytir viðvíkjandi teimum málsøkjum, sum í dag eru felags fyri alt ríkið.

## Hesi øki á føroyskar hendur

Skipanin millum Føroyar og Danmark virkar soleiðis í dag, at Føroyar hava yvirtikið flestu málsøki og hava fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av hesum økjum. Føroyingar hava fullan ræðisrætt á yvirtiknu málsøkjunum.

Nøkur málsøki eru ikki yvirtikin enn. Hesi verða vanliga kallað felagsmál. Fleiri av hesum økjum kunnu yvirtakast, um politiskur vilji er til tað í Føroyum. Tó kunnu nøkur av felagsmálunum løgfrøðiliga ikki yvirtakast undir galdandi ríkisrættarligu støðu. Hetta er staðfest í yvirtøkulógini frá 2005, sum er eitt ískoyti til heimastýrislógina frá 1948.

| Felagsmál, ið ikki kunnu yvirtakast | Felagsmál, ið kunnu yvirtakast |
|---|---|
| Grundlógin | Rættarøkið |
| Danskur ríkisborgararættur | Politi |
| Hægstirættur | Kriminalforsorg |
| Uttanríkis-, trygdar- og verjuøkið | Útlendingaøkið og marknaeftirlit |
| Gjaldoyra- og peningapolitikkur | Fíggjarøkið |

Afturat nevndu felagsmálum, ið kunnu yvirtakast, eru nøkur smærri mál, umframt at heilsuøkið ikki er formliga yvirtikið málsøki, hóast tað verður umsitið og fíggjað í Føroyum. Partur av útlendingaøkinum verður somuleiðis umsitin og fíggjaður í Føroyum, hóast tað er eitt felagsmál. Í báðum førum eru økini heilt ella partvís avhendað til Føroya, men ikki formliga yvirtikin. Loftferðsla er somuleiðis eitt felagsmál, men økið er í løtuni í tilgongd at vera lutvíst yvirtikið av føroysku myndugleikunum.

Tá Føroyar gerast ein sjálvstøðug tjóð, verða øll málsøki sjálvirkandi yvirtikin, um onnur avtala ikki er gjørd. Hetta skal avgreiðast í samráð við Danmark.

Javnaðarflokkurin skýtur upp, at av núverandi felagsmálum, skulu uttanríkismál á føroyskar hendur, meðan hini skulu avhendast aftur til Danmarkar at umsita. Harumframt skulu Føroyar umsita egnan ríkisborgararætt.

## Uttanríkispolitikkur

Av teimum yvirskipaðu málsøkjum, ið ikki kunnu yvirtakast, er tað serliga uttanríkispolitiska økið, ið forðar fyri víðari menning í Føroyum. Sum áður frágreitt, forða núverandi karmar fyri føroyskum limaskapi í fleiri altjóða felagsskapum, ið bæði vinnan, mentanarlívið og politiska skipanin ynskja at blíva partur av. Tí skal uttanríkispolitiska málsøkið á føroyskar hendur í nýggju skipanini við Danmark. Við hesum økist møguleikin hjá Føroyum fyri beinleiðis umboðan í øllum altjóða felagsskapum. Ofta verður uttanríkisøkið nevnt saman við verju- og trygdarøkjunum, hóast talan er um trý serstøk øki. Vit skjóta upp, at verju- og trygdarøkið skal avhendast aftur til danir at umsita. Ein stutt lýsing av hesum kann lesast á síðu 51.

## Føroyskur ríkisborgararættur

Ein partur av at gerast sjálvstøðugur statur er, at Føroyar skulu umsita møguligan føroyskan ríkisborgararætt. Sostatt er talan ikki um eina beinleiðis yvirtøku ella heimtøku av donskum málsøki, men heldur um eina nýggja skyldu, ið fylgir við skiftinum til at gerast sjálvstøðug tjóð. Spurningurin um dupultan ríkisrætt skal samstundis avklárast í samráð við Danmark. Málið er, at bæði føroyingar og danir skulu hava møguleika fyri dupultum ríkisborgararætti. Men sama hvørjum hesar samráðingar enda við, so er greitt, at Føroyar sum sjálvstøðug tjóð skulu umsita føroyskan ríkisborgararætt. Ein lýsing av hesum viðurskiftum er á síðu 47.

# Hesi øki verða verandi á donskum hondum

Økini, ið skulu avhendast aftur til danir at umsita, skulu deilast upp í tveir bólkar. Flestu av málunum, ið ikki kunnu yvirtakast við núverandi skipan, skulu bólkast fyri seg. Hesi málsøki skulu sambært sáttmálanum latast dønum at umsita og kunnu ikki heimtakast aftur, so leingi sáttmálin er galdandi. Hini málsøkini, ið kunnu yvirtakast við galdandi skipan, skulu til einhvørja tíð eisini kunna heimtakast við nýggju skipanini, um politiskur vilji er til tess í Føroyum. (Sjá á næstu síðu)".

| Málsøki avhendast til Danmarkar í sáttmálanum | Málsøki avhendast til Danmarkar, men kunnu yvirtakast í sáttmálaskeiðnum |
|---|---|
| Hægstirættur | Rættarøkið |
| Verjupolitikkur | Politi og Kriminalforsorg |
| Gjaldoyra- og peningapolitikkur | Fíggjarøkið |
| Ríkisyvirhøvur (Statsoverhoved) | Útlendingaøkið og marknaeftirlit |

Samstundis fella nøkur av núverandi felagsmálunum burtur, tí Føroyar sum tjóð fara at umsita egnan ríkisborgararætt og egnu stjórnarskipan. Kongur verður tó framhaldandi formliga yvirhøvur Føroya. Hesi viðurskifti verða viðgjørd seinni í frágreiðingini.

## Business as usual - við fleiri uttanríkispolitiskum heimildum

Við nýggju skipanini fáa Føroyar neyðugu heimildirnar á uttanríkispolitiska økinum, men í flest aðrar mátar verður alt sum vant. Ætlanin er ikki, at vanligi føroyingurin skal merkja stórvegis broytingar í gerandisdegnum.

Inntil Føroyar fáa egna stjórnarskipan, verða partar av donsku stjórnarskipanini galdandi, eins og nú, saman við stýrisskipanarlógini. Føroyar vera framvegis partur av NATO undir donsku verjuni, gjaldoyra verður framvegis danska krónan, og danska kongshúsið fer framvegis at fevna um Føroyar. Rættarøkið og kriminalforsorgin fara at virka á sama hátt sum áður, umframt at politi og trygdartænasturnar halda fram ótarnaðar. Í stuttum: Lagt verður upp til, at øll felags málsøki halda fram sum áður, uttan uttanríkispolitikkurin.

Somuleiðis heldur ríkisveitingin fram við somu møguleikum fyri niðurlagingum sum nú, eins og vinnuligt og mentanarligt samstarv millum londini heldur fram.

Hetta kann tykjast ov gott ella ov lætt til at vera satt, ella kanska virkar tað sum veruleikin verður gjørdur meira einfaldur, enn hann er. Í næsta partinum fara vit tí at viðgera, hvat broytist við at fremja hesa umskipan, og hvat heldur fram sum áður.

# **Nýggir møguleikar** á altjóða pallinum

**Í komandi brotum vísa vit á nøkur ítøkilig viðurskifti, ið kunnu fara at broytast við nýggju skipanini**

> Yvirskipað kann ST-viðurkenning betra um grundarlagið hjá Føroyum at virka í altjóða samfelagnum

Tá tosað verður um at broyta ríkisrættarligu støðu Føroya, er ein av teimum heilt stóru spurningunum: Hvat broytist?

Stutta svarið er, at fyri tann vanliga borgaran broytist lítið og einki. Men formliga – og fyri Føroyar sum tjóð á altjóða pallinum – broytist nógv.

Felagsskapurin við Danmark heldur fram, men nú millum tveir meira javnsettar partar, tí Føroyar fara frá at vera eitt heimastýri undir Danmark til at fáa rættarstøðu sum sjálvstøðugt land í altjóða høpi.

Henda rættarstøða gevur Føroyum munandi betri uttanríkispolitiskar møguleikar, tí tað við hesum millum annað verður gjørligt at gerast sjálvstøðugur limur í fleiri týðandi altjóða felagsskapum.

## Limaskap í Sameindu Tjóðum

Sameindu Tjóðir hava síðani seinna heimsbardaga virkað fyri at tryggja heimsfrið, mannarættindi og samstarv millum heimsins lond.

Av tí at ST er fyri sjálvstøðugar statir, kunnu Føroyar, sum nú er, ikki gerast limur. Við rættarstøðu sum sjálvstøðugur statur kunnu Føroyar søkja um ST-limaskap fyri harvið at blíva altjóða viðurkendar sum statur.

ST-limaskapur gevur eisini atgongd til fleiri millumtjóða felagsskapir undir ST, sum Føroyar í dag “bara” hava atlimaskap í. Yvirskipað kann ST-viðurkenning betra um grundarlagið hjá Føroyum at virka í altjóða samfelagnum og verja síni áhugamál, sum serliga eru innan fiskivinnu og handil.

ST-limaskapur gevur harumframt Føroyum eina rødd í heimspolitikkinum. Hvørt limaland hevur sæti á ST-aðalfundinum og hevur eina atkvøðu – uttan mun til støðd. Harvið kunnu Føroyar sum limaland fáa ávirkan á avgerðir um til dømis veðurlagspolitikk, mannarættindi og trygd, ið verða tiknar á ST-aðalfundunum.

Umframt hesar fyrimunir hevur ST-limaskapur eisini ávísar umsitingarligar treytir við sær í sambandi við altjóða umboðan, sum vit ikki viðgera nærri her.

## Serstovnar undir ST

Niðanfyri er eitt yvirlit av ST-felagsskapum, sum kunnu vera viðkomandi fyri Føroyar at fáa fullan limaskap í. Føroyar hava í dag annaðhvørt atlimaskap ella deildan limaskap við Danmark og Grønland í onkrum av felagsskapunum.

**UNESCO** (Mentamálafelagsskapur),
**WHO** (Heimsheilsufelagsskapurin),
**IBRD** (Heimsbankin),
**IMF** (Millumtjóða gjaldoyragrunnurin),
**ITU** (Millumtjóða fjarskiftissambandið),
**FAO** (Matvøru- og landbúnaðarfelagsskapur)

## Tilgongdin til limaskap í Sameindu Tjóðum

Fyri at gerast limur í ST er neyðugt hjá Føroyum at binda seg til skyldurnar í ST-sáttmálanum frá 1945. ST-sáttmálin er eitt slag av grundlóg fyri felagsskapin, ið lýsir meginreglurnar og reglugerðir í ST.

Ítøkiligu skyldurnar í ST-sáttmálanum, sum eitthvørt limaland skal liva upp til, eru umfatandi, men hava sum høvuðsendamál at varðveita frið og trygd – og í sama viðfangi fyribyrgja einum nýggjum heimskríggi.[25]

Avgerðin um limaskap til hvørja einstaka tjóð verður tikin á ST-aðalfundinum eftir viðmæli frá Trygdarráðnum. Trygdarráðið er tann ST-stovnurin, sum hevur høvuðsábyrgdina av virkseminum í ST. Trygdarráðið er mannað av 15 limum – harímillum fimm varandi limum.

### Tilgongdin fyri upptøku í ST er í stuttum soleiðis:[26]

# 1.

### Umsókn

Landið sendir umsókn og bræv til ST-aðalskrivaran, har formliga verður boðað frá, at tað góðtekur skyldurnar í ST-sáttmálanum.

## 2.

### Góðkenning frá Trygdarráðnum

Trygdarráðið viðger umsóknina. Eitt viðmæli um upptøku krevur, at 9 av 15 limalondum atkvøða fyri, og at eingin av teimum fimm varandi limunum - Kina, Frakland, Russland, Stórabretland og USA - atkvøða ímóti umsóknini.

## 3.

### Góðkenning á Aðalfundinum

Um Trygdarráðið viðmælir upptøku, verður viðmælið lagt fram á aðalfundinum til støðutakan. Her er neyðugt við meiriluta á tveimum triðingum fyri upptøku av nýggjum stati.

## 4.

### Gildiskoma

Limaskapurin tekur gildi á tí degi, avgerðin um upptøku verður samtykt.

# Føroyar betri atgongd til hesar felagsskapir

Tað kann tykjast óítøkiligt at siga, at Føroyar sum statur fáa betri møguleika at taka lut í altjóða samfelagnum. Tí hvat merkir tað?

Í stóran mun merkir tað atgongd – atgongd til felagsskapir og samstørv, ið kunnu vera við til at tryggja Føroyum betri marknaðaratgongd og handilsviðurskifti.

Føroyar eru longu partur av fleiri týðandi felagsskapum, har luttikið verður við bæði atlimaskapi og sjálvstøðugum limaskapi. Men enn eru nakrir felagsskapir, har tað er trupult ella ógjørligt hjá Føroyum at gerast fullgildigur limur, tí teir ofta hava sum krav, at limalond skulu vera sjálvstøðug.

Sum sjálvstøðugt land kunnu Føroyar styrkja og víðka um sína luttøku við sjálvstøðugum limaskapi og í egnum navni sum Føroyar – í staðin fyri sum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne (og Grønland)". Tað er ymiskt frá felagsskapi til felagsskap, hvussu stóran mun tað í praksis kann gera. Men í teimum felagsskapum, har Føroyar luttaka undir DFG-skipanini, er ein eyðsýndur munur, tí tað slepst undan at deila sendinevnd við Grønland, sum ikki altíð hevur somu áhugamál sum Føroyar.

Fyri at gera broytingarnar greiðari, er her eitt yvirlit við nøkrum av teimum felagsskapum, sum Føroyar kunnu fáa munandi betri atgongd til sum statur:

## Norðurlendskt samstarv

Norðurlendska samstarvið fer fram í ávikavist Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Norðurlandaráðið er eitt samstarv millum parlamentini í Norðurlondum, ið virkar fyri samstarvi innan eitt nú rættarøkið, mentan, umhvørvi og búskap. Limalondini eru Danmark, Svøríki, Noreg, Finnland og Ísland. Norðurlendska Ráðharraráðið er hinvegin almenni samstarvsbólkurin hjá hesum somu norðurlendsku stjórnunum.

Føroyar luttaka í norðurlendska samstarvinum, men tað er umvegis tveir sessir, ið Danmark letur Føroyum. Føroyar hava í nógv ár arbeitt fyri sjálvstøðugum limaskapi, men tað hevur ikki borið á mál, tí sambært Helsingforsavtaluni, sum er stovningarskjalið, kunnu bara sjálvstøðug lond gerast sjálvstøðugir limir.[27]

Sum nakað nýtt er ætlanin nú at broyta Helsingforsavtaluna, soleiðis at ikki-statir eisini kunnu gerast sjálvstøðugir limir í Norðurlandaráðnum. Føroyar hava, saman við Danmark, formansskapin ráðharraráðnum í 2026, og hendan møguleikan ætlar mann at brúka til at arbeiða fyri føroyskum limaskapi. Danska forsætisráðfrúan Mette Frederiksen hevur eisini víst sín fulla stuðul til føroyska ynskið um sjálvstøðugan limaskap. Nógv bendir sostatt á, at Føroyar innan heilt stutta tíð verða sjálvstøðugur limur og harvið kunnu luttaka á jøvnum føti við hini londini í norðurlendska samstarvinum við egnum sessum.

At Føroyar gerast sjálvstøðugur statur verður sostatt møguliga ikki longur ein fortreyt fyri sjálvstøðugum limaskapi, og verður tað so, er hetta ikki eitt beinleiðis dømi um ein fyrimun av at broyta ríkisrættarligu støðu Føroya. Hinvegin hevði mann frá føroyskari síðu sloppið undan at broytt viðtøkurnar í Helsingforsavtaluni við

hesi loysn, tí við rættarstøðu sum statur høvdu Føroyar lokið treytirnar fyri sjálvstøðugum limaskapi longu nú.

## IOC – Føroyar í Olympisku Leikunum

Ítróttasamband Føroya (ÍSF) hevur í nógv ár roynt at vunnið Føroyum IOC-limaskap, so Føroyar kunnu luttaka í OL undir egnum flaggi, men tað hevur enn ikki eydnast.

IOC er altjóða nevndin fyri olympisk ítróttasambond, sum millum annað gevur atgongd til Olympisku Leikirnar (OL). IOC hevur sum treyt, at bert sjálvstøðug lond fáa limaskap. Henda treyt hevur staðið við síðan 1992.

Ítróttasamband Føroya hevur kortini tvíhildið um, at tað ber til at fáa undantaksloyvi. Í 1984 søkti ÍSF um limaskap, men umsóknin bleiv ikki viðgjørd, áðrenn upptøkutreytirnar vóru broyttar í 1992. Júst hetta hevur verið brúkt sum grundgeving hjá ÍSF um at fáa eitt undantak til limaskap. Dømi eru um onnur ikki-sjálvstøðug lond, ið eru IOC-limir og luttaka á leikunum, men tey fingu limaskap áðrenn broyttu upptøkutreytirnar í 1992.

Um Føroyar gerast sjálvstøðugur statur við altjóða viðurkenning, fellur grundgevingin fyri at nokta Føroyum limaskap burtur – og so skuldi borið til at blivið limur í IOC.

IOC-limaskapur kann fáa stóran týdning fyri føroyskan ítrótt, tí við hesum kunnu Føroyar luttaka á Olympisku Leikunum, um okkara einstaklingar og lið avrika nóg væl til at kunna luttaka. IOC limaskapur gevur harumframt atgongd til aðrar felagsskapir og kappingar so sum “Games of the Small States of Europe”, ið eru ítróttaleikir fyri smáar tjóðir.

Tað er eisini viðkomandi at spyrja, hvussu ein broytt ríkisrættarlig støða kann ávirka møguleikan hjá Føroyum at luttaka í Oyggjaleikunum. Sambært Ítróttasambandi Føroya fer tað ikki at hava nakra ávirkan, tí limaskapur í IIGA, ið samskipar leikirnar, er knýttur at oyggjasamfeløgum og ikki tjóðskapi. Føroyar fara sostatt sum sjálvstøðug tjóð framhaldandi at kunna taka lut í Oyggjaleikunum.

## Egna rødd í Arktiska Ráðnum

Arktiska Ráðið er formliga millumtjóðasamstarvið um arktisk viðurskifti. Limalondini eru USA, Russland, Kanada, Svøríki, Finnland, Noreg, Ísland og Danmark/Grønland/Føroyar.

Føroyar eru ikki umboðaðar í egnum navni í Arktiska Ráðnum. Í staðin eru Føroyar partur av eini tríbýttari sendinevnd saman við Danmark og Grønlandi, har Danmark hevur formansskapin. Tey trý londini kunnu - við støði í DFG-skipanini - skiftast um at sita við borðendan, og tey skulu vera samd um, hvørji sjónarmið sendinevndin skal bera fram til fundirnar í Arktiska Ráðnum.[28]

Sum sjálvstøðugt land kunnu Føroyar stíla ímóti at blíva sjálvstøðugur limur í Arktiska Ráðnum. Við sjálvstøðugum limaskapi kunnu Føroyar umboða seg sjálvar og síni arktisku áhugamál uttan at taka atlit til, um tey eru í stríð við sjónarmiðini hjá Danmark og Grønlandi. Føroyskur limaskapur sum sjálvstøðugt land er tó treytaður av, at Føroyar lúka krøvini til upptøku, og øll limalondini í Arktiska Ráðnum skulu atkvøða fyri upptøku av nýggjum limalandi.

Sigast skal, at tað ikki er vist, at Føroyar verða góðtiknar sum sjálvstøðugur limur í Arktiska Ráðnum. Hóast Føroyar geografiskt eru á gáttini til Arktis, kann tað vera ivasamt, um Føroyar verða góðkendar sum ein fullgyldugur arktiskur statur. Tí kann tað henda, at Føroyar missa verandi umboðanina gjøgnum danska ríkið og ikki fáa sjálvstøðuga umboðan.

## EBU – Føroyar í Eurovision

Seinastu árini hava fleiri føroyingar luttikið í Melodi Grand Prix undankappingum til stórfingnu finaluna, Eurovision. Føroyingar hava serliga gjørt um seg í donsku kappingini, men vit hava eisini sæð føroyingar í íslendsku og svensku kappingunum. Tvær ferðir er tað eydnast føroyingum at vinna nationalu kappingina fyri síðani at umboða Danmark í Eurovision. Tí er nærliggjandi at spyrja: Hví luttaka Føroyar ikki í Eurovision? Svarið er lutvíst treytað av ríkisrættarligu støðu Føroya.

Fyri at kunna luttaka í Eurovision er neyðugt hjá Føroyum – ella Kringvarpi Føroya – at vera limur í EBU (European Broadcasting Union). EBU er ein evropeisk samgonga fyri public service sjónvarps- og útvarpsstøðir, og tað er EBU, sum skipar fyri Eurovision-sangkappingini. Av tí at Kringvarpið, sum er føroyska public service støðin, ikki er limur í EBU, kunnu Føroyar ikki luttaka í Eurovision.

Kringvarpið og Mentamálaráðið hava áður kannað, um tað ber til at fáa limaskap. Í 2010 var svarið frá EBU, at bara sjálvstøðug lond kunnu gerast limir.[29]

Í staðin hevur mann roynt at funnið aðrar loysnir, og í 2024 væntaði Kringvarpið, at tað møguliga bar til at fáa serligan limaskap, hóast Føroyar ikki eru sjálvstøðugur statur. Tó var táverandi fíggjarstøða í Kringvarpi Føroya ein forðing fyri at gera álvara av at søkja, tí upptøka kostar 1,5 milliónir krónur, umframt árligt limagjald á hálva millión.[30]

Hetta er eitt dømi um ein felagsskap, har tað møguliga ber til at fáa undantak sum ikki-sjálvstøðug tjóð. Hetta kann tó ikki sigast við vissu enn, tí ætlanirnar um at søkja um limaskap fyribils eru sleptar. Men vegurin til limaskap verður alt annað líka slættari at ganga við støðu sum sjálvstøðug tjóð, tí so er ein (í øllum førum fyrrverandi) høvuðsgrundgeving fyri at nokta føroyskum limaskapi burtur.

Hóast tað kostar nakað at gerast limur í EBU er týdningurin av føroyskari Eurovision-luttøku ikki at forsmáa. Við sínum 166 milliónum hyggjarum kann Eurovision vera ein altjóða sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik, og ikki minst fyri Føroyar sum ferðavinnuland.

# Búskapur og handil

Umframt teir millumtjóða felagsskapir, ið Føroyar í dag eru limur í ella hava ynski um at gerast limur í, eru aðrir stórir felagsskapir, sum tað í løtuni ikki eru ítøkiligar politiskar ætlanir um at gerast limur í. Kortini eru hesir felagsskapir verdir at nevna í sambandi við broyttu rættarstøðu Føroya.

## EFTA

Limaskapur í fríhandilsfelagsskapinum EFTA kann fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív, tí limaskapur gevur atgongd til allar EFTA-marknaðirnar. Eydnast tað Føroyum at blíva limur í EFTA, kann næsta stig vera at gerast partur av EBS-avtaluni, sum gevur atgongd til stóra ES-marknaðin. Fyrimunurin við hesum leisti, í mun til ES-limaskap, er, at hann gevur Føroyum atgongd til evropeiska

innara marknaðin, samstundis sum til ber at hava egnan fiskivinnupolitikk.

Føroyar vóru limir í EFTA frá 1968, inntil Danmark fór upp í EF í 1973. Seinastu árini hevur fleiri ferðir verið upp á tal at søkja um EFTA-limaskap av nýggjum, men Føroyar hava tó ikki søkt enn.

Tilgongdin til limaskap undir núverandi ríkisrættarligu skipan er sera fløkjaslig. Tað ber í teoriini til hjá Føroyum at fáa limaskap í EFTA vegna Danmark við uttanríkispolitisku heimildarlógini, men hetta hevði kravt sera stóra vælvild frá Danmark og serliga frá hinum EFTA-limunum.

Sum sjálvstøðugt land lúka Føroyar treytirnar fyri at gerast sjálvstøðugur limur í EFTA í egnum navni. Limaskapur er tó ikki ein sjálvfylgja, tí tað krevur, at øll tey fýra limalondini eru fyri upptøku av nýggjum limalandi, og tað fer helst at krevja drúgvar samráðingar. Tað hevði kortini verið munandi meira einfalt, enn tað er í verandi støðu.

## ES

Eydnast ikki at fáa EFTA-limaskap og gerast partur av EBS-samstarvinum, so kunnu Føroyar umhugsa at søkja um limaskap í Evropeiska Samveldinum (ES).

ES-limaskapur kann hava nakrar avmarkingar við sær í sambandi við felags fiskivinnupolitikk, umframt herd krøv til m.a. seyðahald, fuglaveiðu og grindadráp. Men ES-limaskapur hevur eisini fleiri fyrimunir við sær. Føroyar høvdu fingið atgongd til allar fríhandilsavtalur hjá ES, sum hevði betrað munandi um útflutningsmøguleikarnar hjá vinnuni. Føroysk vinna hevði fingið fingið alt ES sum heimamarknað, sum kann gera føroyskar útflutnings-fyritøkur kappingarførari. Við fullari atgongd til innara marknaðin hjá ES høvdu tollforðingarnar á víðarivirkaðum fiskavørum eisini fallið burtur.

Í eini tíð, har tollur verður brúktur sum strategiskt amboð á heimspallinum, og føroyskur útflutningur kann verða raktur frá einum degi til annan, er eingin ivi um, at tollfrí atgongd til evropeiska brúkaran hevði verið ein stórur tryggleiki.

Í verandi løtu kunnu Føroyar gerast limur av ES í navni Kongsríki Danmarkar, sum partur av danska limaskapinum. Men sum sjálvstøðugt land kunnu Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í ES í egnum navni.

## EBS

EBS (Evropeiska Búskaparliga Samstarvsøkið) er eitt samstarv millum ES, ES-kommisiónina og teir tríggjar EFTA-limirnar, Ísland, Liechtenstein og Noreg. Avtalan tryggjar frían flutning fyri tey fýra frælsini (vørur, tænastur, kapital og persónar) við undantakið fyri ávísar landbúnaðar- og fiskavørur.

Fortreytin fyri EBS-limaskapi er limaskapur í EFTA ella ES. Sjálvstøðugur limaskapur í egnum navni krevur eisini, at Føroyar verða ein statur.

Verða Føroyar sum komandi statur limur í EFTA, eins og vit leggja upp til, eru grundleggjandi treytirnar fyri EBS-limaskapi loknar, og til ber at fara undir eina tilgongd, um politiskur vilji er til tað. Við EBS-limaskapi høvdu Føroyar kunnað fingið atgongd til innara marknaðin hjá ES.

At blíva partur av EBS-samstarvinum er tó ein drúgv samráðingartilgongd, ið eisini hevur við sær ymisk krøv um ES-lóggávu. Men um hetta eydnast tað verða fyrimunirnir stórir fyri føroysku vinnuna.

# Sjófeingi og fiskivinna

Fyri Føroyar sum fiskivinnutjóð hevur luttøka í millumtjóða felagsskapum og samstørvum, sum á ymsan hátt snúgva seg um fiskivinnu, hav og havtilfeingi, stóran týdning fyri føroysk áhugamál. Føroyar luttaka longu í fleiri av hesum felagsskapum, bæði sjálvstøðugt og sum partur av DFG-skipanini, har Føroyar og Grønland í felag mynda donsku sendinevndina.

## NEAFC

NEAFC (North East Atlantic Fisheries Commission) er millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í landnyrðingsparti av Atlantshavinum. Í dag luttaka Føroyar saman við Grønlandi undir heitinum Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland (DFG).

## NASCO

NASCO (North Atlantic Salmon Conservation Organization) er millumtjóða felagsskapur fyri umsiting av laksafiskiskapi í Norðuratlantshavi. Í dag luttaka Føroyar saman við Grønlandi undir heitinum Denmark in respect of Faroe Islands and Greenland (DFG).

## NAFO

NAFO (Northwest Atlantic Fisheries Organization) er millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingsparti av Atlantshavi. Í dag luttaka Føroyar saman við Grønlandi undir heitinum Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland (DFG).

## SPRFMO

SPRFMO (South Pacific Regional Fisheries Management Organisation) er millumtjóða fiskiveiðufelagsskapur fyri fiskiskap í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavi, og sáttmálin fevnir um veiðu eftir botnfiski og uppsjóvarfiski. Í dag luttaka Føroyar undir heitinum Denmark in respect of the Faroe Islands (DF).

## IMO

IMO (International Maritime Organization) er ein ST-felagsskapur um altjóða sjóferðslu. Virksemið hjá IMO fevnir um øll viðurskifti viðvíkjandi skipaferðslu, umhvørvisvernd og trygd á sjónum. Føroyar fingu atlimskap í IMO í 2002.

## FAO

FAO (Food and Agriculture Organization) er ein ST-felagsskapur um matvørur og landbúnað. Limalondini í FAO samstarva um fiskivinnu í fiskivinnunevndini, nevnd COFI (Committee on Fisheries). Føroyar fingu atlimaskap í FAO í 2007.



# Aðrar broytingar við umskipan av felagsskapinum

## Føroyskur ríkisborgararættur

Føroyingar fáa egnan føroyskan ríkisborgararætt tá Føroyar gerast sjálvstøðugt land. Samstundis verður lagt upp til at varðveita danskan ríkisborgararætt – og harvið hava dupultan ríkisborgararætt. Hetta tryggjar bæði atgongd til rættindi í Danmark og í Føroyum. Samstundis skulu danir, ið flyta til Føroyar, lættliga kunna fáa føroyskan ríkisborgararætt. Greitt verður nærri frá hesum á síðu 46 undir "Hvat broytist ikki?"

## Tvey møgulig pass

Við dupultum ríkisborgararætti hevur mann tvey pass – føroyskt (grønt) og danskt (reytt). Í so máta verður eingin broyting her.

## Fólkatingssessirnir verða avtiknir

Neyðugt verður ikki longur við føroyskum umboðum á Fólkatingi. Samstarvið millum Danmark og Føroyar verður framyvir á stjórnarstigi. Hetta er í veruleikanum galdandi í dag. Tað eru ikki fólkatingsumboðini, sum formliga umboða Føroyar mótvegis donskum myndugleikum, men heldur landsstýrið.

## Skuldir og ognir

Ríkisrættarligar broytingar kunnu fáa týdning fyri almennar ognir og skuld hjá londunum hvør hjá øðrum. Spurningar um ábyrgd av ognum og skuld skulu loysast við samráðingum

samsvarandi reglum í altjóða rætti, men neyðugt verður at lýsa hetta økið nærri – serliga í sambandi við skuld. Ognir kunnu eitt nú fevna um bygningar, stovnar, lutir og arkiv.

## Altjóða umboðan

Ein partur av at vera ein sjálvstøðug tjóð er tann altjóða umboðan, ið fer fram við diplomatii og umboðsstovum. Roknast kann við, at tað fer at krevja økta fíggjarliga, diplomatiska og fyrisitingarliga orku at fyrireika og røkja altjóða umboðanina. Hetta kann eitt nú fevna um ST-umboðan og sendistovuvirksemi – og í tí sambandi møguligar umraðfestingar ella víðkan av uttanríkistænastuni. Talan er um eina longri tilgongd, sum eisini er tengd at framtíðar politiskum ynskjum, og tí koma vit ikki nærri inn á smálutirnar í altjóða umboðan í hesum útspæli.

## Stjórnarskipan

Tað er grundleggjandi fyri eitthvørt land at hava eina stjórnarskipan. Ein stjórnarskipan staðfestir hvør hevur valdið, hvussu valdið verður býtt, hvørji rættindi borgarar hava, og hvørji virði samfelagið er grundað á. Í løtuni er danska grundlógin galdandi í Føroyum, men við hesum uppskoti um at skipa Føroyar sum stat, verða Føroyar ikki longur formliga fevndar av donsku grundlógini.

Í fyrstu syftu verður lagt upp til eina fyribils skipan, har Føroyar í eini skiftistíð enn eru fevndar av donsku grundlógini, samstundis sum ein endalig Stjórnarskipan Føroya verður fyrireikað.

Sambært danska løgfrøðinginum Ole Spiermann ber væl til hjá Føroyum at skipa seg sum stat uttan eina fullfíggjaða stjórnarskipan, tí í prinsippinum er einki krav um, at lond skulu hava eina grundlóg. Til dømis hava hvørki Bretland, Kanada ella Ísrael formligar grundlógir. Tí ber í prinsippinum eisini til at “kopiera” viðtøkurnar úr donsku grundlógini og brúka tær í Føroyum.

Stýrisskipan Føroya verður framvegis galdandi sum karmur, meðan viðtøkurnar úr donsku grundlógini um borgararættindi og annað, ið stýrisskipanin annars ikki fevnir um, verða settar í verk. Í praksis verður sostatt eingin broyting í fyrstu syftu.

Sigast skal, at eitt rættiliga fullfíggjað uppskot um føroyska grundlóg er gjørt. Arbeitt hevur verið við hesum í fleiri umførum frá 1999 til 2018, og hóast tað ikki hevur borið á mál, er eingin ivi um, at hetta arbeiðið kann nýtast sum grundarlag, tá ein nýggj føroysk grundlóg skal skrivast.

# **Verandi skipanir** og rættindi halda fram

**Ein av mest viðkomandi spurningunum í sambandi við nýggja felagsskapin millum Føroyar og Danmark er, hvussu borgarar í báðum londunum verða ávirkaðir av broytingunum. Nýggja støðan fer óivað at hava sína ávirkan, men tað er somuleiðis týdningarmikið at vísa á, at flestu skipanir, sum beinleiðis hava ávirkan á okkara gerandisdag, ikki broytast.**

Tá talan er um eitt nú sjúkraviðgerðir, útbúgvingarmøguleikar og samhandilin við Danmark, hava ivamál verið um, hvussu rættindini hjá føroyingum í hesum sambandi fara at broytast, um Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum, sum vit kenna hann í dag. Hesi økini broytast tó ikki. Sjúkraviðgerðir eru longu fíggjarliga og fyrisitingarliga yvirtikið málsøki, útbúgvingarmøguleikarnir kunnu tryggjast á aðrar hættir – annaðhvørt í beinleiðis avtalu millum Føroyar og Danmark ella gjøgnum norðurlendskar sáttmálar – og samhandilin er ikki knýttur at løgfrøðiliga partinum av ríkisfelagsskapinum

Ein týðandi partur í hesum sambandi verður at tryggja tvíbýttan ríkisborgararætt millum føroyingar og danir, soleiðis at eingin missir verandi rættindi.

Í hesum partinum verða nakrar av skipanunum, sum Føroyar delegera aftur til Danmarkar gjøgnumgingnar, umframt skipanir, sum Føroyar longu umsita.

## Varðveita danskan ríkisborgararætt

Føroyingar hava í dag danskan ríkisborgararætt. Tá ið Føroyar skipa seg í nýggjan felagsskap við Danmark og verða viðurkendar av ST sum tjóð, koma føroyingar av sær sjálvum at fáa føroyskan ríkisborgararætt. Tó er ynskið at varðveita sterka tilknýtið til Danmarkar. Tí ynskja vit í nýggja felagsskapinum at hava dupultan ríkisborgararætt, soleiðis at føroyingar í Danmark varðveita danskan ríkisborgararætt og danskarar í Føroyum fáa føroyskan ríkisborgararætt. Møguleikin at varðveita ríkisborgararættin kann vera avgerandi fyri rættindi í báðum londunum, og tí verður hetta eitt aðalmál í avtaluni við Danmark. Fleiri av dømunum, vit í komandi brotum fara at gjøgnumganga, kunnu verða tengd av møguleikanum at hava dupultan ríkisboragararætt.

Í grein 6 í samveldislógini millum Ísland og Danmark frá 1918 er staðfest, at danskir og íslendskir borgarar skuldu hava javnbjóðis rættindi í londunum hjá hvørjum øðrum.[31] Hetta var ikki einans ein litil áseting millum partarnar, men ein grundleggjandi trygd fyri, at borgararnir ikki mistu síni rættindi í hesum tíðarskeiðnum, tá Ísland var á veg úr ríkinum. Skipanin tryggjaði sosial og fíggjarlig rættindi, men hevði eisini eina týdningarmikla mentanarliga og samfelagsliga ávirkan, tí hon gjørdi tað møguligt hjá borgarum at halda fast í sínum sosiala tilknýti, hóast tann politiska støðan broyttist.

Táverandi skipan millum Danmark og Ísland kann standa sum fordømi fyri sambandið millum Føroyar og Danmark. Í dag búgva nógvir føroyingar í Danmark og danskarar í Føroyum. Tað er ringt at gera upp, hvussu nógvir føroyingar búgva í Danmark, og hvussu nógvir danskarar búgva í Føroyum, tí bæði føroyingar og danir hava danskan ríkisborgararætt. Sambært tølum frá Danmarks Statistik búgva áleið 10.000 føroyingar í Danmark.[32] Hetta fevnir um persónar, sum eru føddir í Føroyum og búsitandi í Danmark. Talið skal tó takast við fyrivarni, tí nógvir føroyingar eru føddir í Danmark, millum annað tá ið foreldrini vóru undir lesnaði, og eru tí ikki við í tølunum hjá Danmarks Statistisk sum fødd í Føroyum, tá tey fara til Danmarkar seinni í lívinum. Ein meting hjá Hagstovu Føroya, í sambandi við dokumentarrøðina hjá Kringvarpi Føroya Kanst tú siga farvæl? í 2024, var, at tað eru millum 10.000 og 15.000 føroyingar búsitandi í Danmark.[33] Tá eru føroyingar, føddir í Danmark, eisini við í yvirlitinum.

Tað sama er galdandi við uppgerðini av dønum búsitandi í Føroyum. Sambært Hagstovuni búðu í september 2025 4653 fólk í Føroyum, ið eru fødd í Danmark.[34] Hetta talið skal eisini takast við fyrivarni, men tølini geva eina ábending um, at lutfalsliga fleiri danir búgva í Føroyum enn føroyingar í Danmark. Tí er tað eisini eitt áhugamál hjá Danmark at tryggja dønum í Føroyum galdandi rættindi við at veita dupultan ríkisborgararætt.

## Heilsuverkið

Ofta verður sagt, at um Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum, skulu føroyingar sjálvir gjalda fyri tær tænastur, sum vit í dag fáa frá danska heilsuverkinum. Veruleikin er, at hetta longu er støðan.

Heilsuverkið er delegerað til føroyskar myndugleikar at umsita, og tí er fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgdin føroysk. Hetta merkir, at føroyingar rinda fyri heilsutænastur, sum verða veittar føroyingum. Hetta er bæði galdandi fyri tænasturnar, sum verða veittar í Føroyum og fyri tænastur, sum – umvegis føroyska heilsuverkið – verða veittar uttan fyri Føroyar. Eitt nú tá ið sjúklingar verða sendir til Danmarkar til kanningar og viðgerðir, ella tá ið danskir serfrøðingar koma til Føroya.

Sambært tølum frá Búskaparskipan Landsins vóru útreiðslurnar til sjúkrahúsviðgerð í Danmark umleið 148 milliónir krónur í 2024.[35] Her er talan millum annað um keyp av viðgerð í Danmark og avtalur við danskar regiónir um læknar, sum koma til Føroya. Afturat hesum hevur Sjúkrahúsverkið avtalur við aðrar læknar í Danmark, sum arbeiða sum konsulentar og fáa løn í Føroyum, og sum tískil ikki eru við hesum samlaða prísyvirlitinum.

Hóast Føroyar gjalda fyri heilsutænasturnar úr Danmark, hava føroyingar, vegna danska ríkisborgararættin, ein framíhjárætt í danska heilsuverkinum. Hetta merkir, at føroyingar fáa atgongd til viðgerðir og tænastur á sama støði sum danir. Tað er ikki ein sjálvfylgja, at hesin framíhjárætturin verður varðveittur í einum nýggjum felagsskapi við Danmark. Tað eigur at verða eitt greitt føroyskt ynski, at føroyingar eisini frameftir skulu hava somu atgongd til danska heilsuverkið sum í dag.

## Útbúgvingarmøguleikar uttan fyri Føroyar

Fróðskaparsetur Føroya er í stórari menning, og fleiri velja at nema sær hægri útbúgving í Føroyum, men somuleiðis fara fleiri lesandi eisini undir hægri lesnað uttanfyri landoddarnar. Tey flestu fara til Danmarkar at lesa, og sambært Studna vóru 732 føroyingar undir hægri lesnaði í Danmark í 2023/2024.[36] Ríkisfelagsskapurin gevur føroyingum fyrimunir á útbúgvingarøkinum í Danmark. Føroysk lesandi sleppa millum annað at søkja inn á jøvnum føti við donsk lesandi og fáa danskan lestrarstudning.

## Møguleiki at søkja

Tað eru tó ikki einans føroysk lesandi, sum hava møguleikan at søkja á hendan hátt, tí hini Norðurlondini hava eisini hendan møguleikan. Hetta er staðfest í avtalu, sum londini í Norðurlandaráðnum hava bundið seg til. Avtalan varð upprunaliga samtykt í 1996 og tryggjar lesandi í Norðurlondunum, herundir Føroyum, Grønlandi og Álandi, møguleikan at fara undir hægri útbúgving í øllum Norðurlondum.

Sambært grein 1 í avtaluni hava partarnir skyldu at geva umsøkjarunum, sum hava fastan bústað í øðrum Norðurlandi, atgongd til hægru útbúgvingar undir somu treytum sum umsøkjarar úr egnum landi. Hetta merkir, at lesandi úr Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki uttan avmarkingar kunnu søkja um upptøku á hægri lærustovnum í hesum londunum. Afturfyri at lesandi kunnu lesa í londunum hjá hvørjum øðrum, rinda londini, undantikið Ísland, eitt endurgjald til móttakaralandið, sum tann lesandi lesur í.[37]

Føroyar eru í dag eisini partur av avtaluni, men tað er gjøgnum Danmark, tí Føroyar ikki eru sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum. Møguleikin at søkja inn á hægri lestur í Norðurlondum á jøvnum føti við aðrar norðurlendingar kann sostatt væl tryggjast í nýggju skipanini, men ein treyt fyri hesum er, at føroyingar antin fáa dupultan ríkisborgararætt ella at Føroyar fáa sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum.

Sum áður nevnt bendir nógv á, at Føroyar innan heilt stutta tíð verða limir í Norðurlandaráðnum á jøvnum føti við hini Norðurlondini. Limaskapurin kemur at hava við sær, at Føroyar millum annað kunnu blíva partur av avtaluni, sum tryggjar lesandi møguleikan at fara undir útbúgving í hinum Norðurlondunum. Tí er tað einki, sum talar fyri, at góðu útbúgvingarmøguleikarnir fyri føroyingar koma at broytast í framtíðini.

## Møguleikin fyri studningi

Sum danskir ríkisborgarar, koma føroyingar í dag undir donsku SU-skipanina, tá ið lesturin er í einum øðrum Norðurlandi enn Føroyum. Tey, sum lesa hægri lestur uttanfyri Norðurlond, og ikki fáa stuðul frá SU, hava møguleika at søkja stuðul úr føroysku ÚSUN-skipanini. Hesin stuðulin er til skúlagjald og livikostnað og verður veittur úr Studna.[38]

Spurningurin um, hvørt føroyingar fáa stuðul frá SU í

nýggja felagsskapinum við Danmark kann verða tengdur av varðveitsluni av dupulta ríkisborgararættinum. Varðveita føroyingar danska ríkisborgararættin kann serstøk avtala gerast við danir um SU-stuðul til føroyingar. Hetta fer tó at krevja vælvild frá danskari síðu. Ein annar møguleiki er ein skipan líknandi núverandi ÚSUN-skipanini, sum føroyingar skulu søkja úr, tá teir fara uttanlands at lesa.

## Kongshúsið

Tá ið Føroyar fara úr donsku grundlógini, kemur Stýrisskipan Føroya at vera karmur um lógirnar í Føroyum. Tey økini, sum ikki standa í stýrisskipanini, koma Føroyar at "lána" frá donsku grundlógini inntil føroyska stórnarskipanin er sett í verk. Dømi um hetta er kongshúsið, sum vit mæla til eisini verður ríkisyvirhøvur Føroya í framtíðini. Hetta líkist Commonwealth skipanini, sum er ein samgonga millum Stóra Bretland og fleiri av gomlu hjálondunum. Felags fyri hesi londini er, at tey eru blivin sjálvstøðug frá Bretlandi, men framvegis hava felags ríkisyvirhøvur (kong).

Løgfrøðiliga ber ein slík skipan væl til. Sambært danska løgfrøðinginum Ole Spiermann er eingin løgfrøðilig forðing fyri, at sjálvstøðug lond samanseta sína egnu stýrisskipan á hendan hátt.

## Samhandilin millum Føroyar og Danmark

Søgulig viðurskifti, sterk mentanarlig og politisk bond og praktiskir fyrimunir gera, at samhandilin millum Føroyar og Danmark í dag er ein stórur partur av sambandinum millum londini.

Handilssambandið hevur í stóran mun sín uppruna í ríkisfelagsskapinum, men er í sjálvum sær ikki knýtt at løgfrøðiliga partinum av ríkisfelagsskapinum. Tað vil siga, at handilssambandið við Danmark er tað sama, óansæð hvussu politisku viðurskiftini eru millum londini.

Tøl frá Hagstovuni vísa, at føroyski innflutningurin úr Danmark í 2024 var umleið 2,4 milliardir krónur, meðan føroyski útflutningurin til Danmarkar var umleið 1,2 milliardir.[39] Hetta merkir í stuttum, at Føroyar innflyta tvífalt so nógv úr Danmark, sum Danmark innflytir úr Føroyum. Hóast tølini broytast frá ári til ár, vísir gongdin støðugt, at Danmark á hvørjum ári hevur eitt rímiligt handilsyvirskot av samhandlinum við Føroyar.

Tá ið Føroyar innflyta vørur úr øðrum londum, verður hetta í flestum førum eisini gjørt gjøgnum Danmark. Tey flestu agenturini liggja í Danmark, og hetta merkir, at føroyskar fyritøkur enntá rinda til Danmarkar, tá tær innflyta beinleiðis úr til dømis Norra. Á hendan hátt

> Størri sjálvræði á uttanríkispolitiska økinum er ein av høvuðsorsøkunum til ynskið frá føroyskari síðu at gera ein nýggjan felagsskap við Danmark.

tjenar Danmark eisini uppá Føroyar, tá innflutt verður úr øðrum londum enn Danmark.

Samhandilin millum Føroyar og Danmark kemur í lítlan mun at verða ávirkaður av nýggja felagsskapinum. Tvørturímóti eigur tað at verða roknað sum eitt áhugamál hjá Danmark at tryggja og varðveita samhandilin, tí hann er gagnligur fyri danskan búskap. Tískil er tað sannlíkt, at Danmark í nýggja felagsskapnum fer at virka fyri at varðveita verandi handilssamstarv.

## Verja og trygd

Størri sjálvræði á uttanríkispolitiska økinum er høvuðsorsøkin til ynskið um at gera ein nýggjan felagsskap við Danmark. Í hesum útspælinum verður lagt upp til, at verju- og trygdarpolitikkur verður delegeraður aftur til Danmarkar at umsita. Samstarvið á hesum økinum er gott, og vit hava seinastu árini sæð ein øktan áhuga fyri Føroyum á verju- og trygdarpolitiska økinum. Av tí sama hevur tað stóran týdning, at framhaldandi varðveita hetta góða samstarvið.

Føroyar eru í dag fevndar av danska limaskapinum í norðuratlantisku verjusamgonguni, NATO, og eru harígjøgnum tryggjaðar verju umvegis grein 5 í NATO-sáttmálanum, ið sigur, at um eitt limaland verður álopið, er tað eitt álop á øll NATO-lond. Vit leggja upp til, at hendan støðan verður óbroytt í framtíðini, soleiðis at Føroyar framhaldandi verða partur av danska limaskapinum í NATO.

Samstundis er avgerandi, at Føroyar eru ein virkin og álítandi samstarvsfelagi í NATO-høpi. Føroyar eiga at luttaka í verju- og trygdarpolitiska samstarvinum í Norðuratlantshavi við til dømis tilbúgving, eftirliti, útgerð og at geva NATO loyvi til at nýta landøki og havnir. Tað er vanligt, at smá lond uttan egna verju gera slíkar avtalur - eitt dømi er Ísland, ið hevur eina avtalu við USA og er partur av US Homeland Security. Júst hvussu hetta kann skipast í Føroyum, má vera upp til framtíðar politiskar samráðingar, alt eftir hvør tørvurin er, og hvørji ynski okkara sameindu hava.



# Búskapur

Nøkur av teimum mest umrøddu evnunum í kjakinum um framtíðar sambandið millum Føroyar og Danmark, eru búskaparlig viðurskifti. Spurningar um ríkisveiting, kredittmeting og rentustøði verða tíðum viðgjørdir, tí hesi viðurskifti ávirka bæði fíggjarliga førleikan hjá Føroyum og fíggjarliga støðufestið í einum nýggjum felagsskapi. Í hesum brotinum verður tí greitt frá, hvussu hesi viðurskifti hava ment seg seinastu áratíggjuni, og hvussu tey eiga at síggjast í sambandi við eina umskipan av ríkisrættarligu støðuni. Ein varlig meting hjá Javnaðarflokkinum er, at tað er møguleiki fyri, at hvørki ríkisveiting, kredittmeting ella rentustøði nýtast at broytast stórvegis, um Føroyar verða sjálvstøðugur statur.

## Ríkisveiting

Tað vóru ikki minst fíggjarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, sum vóru høvuðsorsøkin til, at fullveldissamráðingarnar um aldarskiftið hildu uppat.

Áðrenn Føroya Landsstýri skar ríkisveitingina við einum triðingi tann 1. januar 2002, var hon um 995 milliónir krónur. Tað svaraði til umleið 10% av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) í 2001, sum tá var um 9,5 mia. krónur. Útreiðslurnar hjá landskassanum í 2001 vóru um 3 mia. kr., og inntøkurnar vóru um 3,7 mia. kr. Ríkisveitingin var tí umleið 27% av inntøkunum og umleið 33% av útreiðslunum hjá landskassanum í 2001. Síðan tá er føroyski búskapurin nærum trífaldaður, blokkurin er fastfrystur og skorin niður í 542 milliónir krónur í 2026 og telur tilsamans bara 2% av føroysku bruttutjóðarúrtøkuni og 5% av inntøkunum hjá tí almenna.

Hóast føroyingar í dag, samanborið við ár 2000, hava munandi betri búskaparlig kort á hondini, tá farið verður til samráðingar um ein nýggjan felagsskap við Danmark, er tað framvegis óhugsandi, at ríkisveitingin úr Danmark skal niður á null innan heilt fá ár. Hetta er heldur ikki ætlanin hjá Javnaðarflokkinum. Vit leggja upp til, at eingin broyting verður í ríkisveitingini í nýggja sáttmálanum við Danmark, og tí setur sáttmálin ikki vælferðina hjá føroyingum uppá spæl. Møguleiki skal tó framhaldandi vera fyri at niðurlaga blokkin við skynsemi komandi árini.

Hvørt danir vilja rinda fíggjarligan stuðul til Føroya eftir eina umskipan, fara samráðingarnar millum londini at vísa. Framhaldandi ríkisveiting eftir, at Føroyar gerast statur er, sum áður nevnt, ikki eitt eindømi. USA veitir framvegis fíggjarligan stuðul til Marsalloyggjarnar, Mikronesia og Palau, hóast londini hava verið sjálvstøðug í meir enn 30 ár.

# Kredittmeting av Føroyum

Umskipanin av felagsskapinum við Danmark fer væntandi at ávirka kreditt-metingina hjá Føroyum. Ábendingar eru tó um, at talan verður um eina avmarkaða broyting, ið neyvan fær stórar avleiðingar. Í hesum broti hyggja vit nærri at Moody's-metingini av Føroyum.

## Moody's meting

Moody's er eitt altjóða viðurkent kredittmetingarfelag, ið metir um búskaparligu støðuna hjá londum, stovnum og fyritøkum. Metingin, ið Moody's hvørt ár kemur við, sigur nakað um, hvussu evnini hjá einum landi eru at rinda aftur skuld. Ein góð meting (en: rating) hevur stóran týdning, tí við henni økjast sannlíkindini fyri, at íleggjarar vilja veita landinum lán. Metingin ávirkar eisini hvørja rentu landskassin skal rinda fyri síni lán. Jú betri kredittmeting, jú lægri verður rentan, tá landið skal taka lán.

Seinastu árini hava Føroyar fingið góða kredittmeting frá Moody's. Metingin hjá Føroyum fyri 2025 er – eins og nógvu undanfarnu árini – Aa2, sum er triðhægsta meting á Moody's-metingarstiganum. Onnur lond, ið hava hesa meting eru Qatar, United Arab Emirates og Suður Korea. Danmark hevur hægst møguligu meting, sum er Aaa.

Orsøkin til afturvendandi góðu metingina er, at Føroyar hava fíggjarligt sjálvræði, góð rakstrarúrslit (áðrenn løgur), lutfalsliga lítla skuld og gott gjaldføri. Avbjóðingarnar eru hinvegin einstáttaður búskapur og høgur íløgutørvur orsakað av fólkavøkstri.

At Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark verður mett sum ein orsøk til góðu metingina hjá Føroyum. Fyri tað fyrsta verður ríkisveitingin mett sum ein støðug og trygg inntøkukelda. Eisini verður nevnt, at Danmark helst fer at koma Føroyum til hjálpar, um Føroyar koma í fíggjarligar trupulleikar. Sambært Moody's kann metingin sostatt versna, um sambandið við Danmark viknar: "A weakening in the relationship with Denmark could also have negative rating implications".[40]

So er spurningurin, hvussu stóra ávirkan tað kann fáa á metingina hjá Føroyum, um Føroyar fara úr núverandi ríkisfelagsskapi og í nýggjan felagsskap. Allar broytingar

> Ein niðurgradering frá Aa2 til Aa3 ávirkar sannlíkt rentuna nakað, men í avmarkaðan mun.

í sambandinum millum Føroyar og Danmark skulu metast gjølla í eini metingarnevnd hjá Moody's, ið tekur atlit til øll hugsandi viðurskifti. Tískil er torført at seta ítøkilig tøl á eina sertstaka broyting, hóast alt annað í okkara meting verður óbroytt. Tí skal greiningin takast við fyrivarni.

Grundarstøðið hjá Føroyum – sonevnda BCA-metingin – er Aa3 (Baseline Credit Assessment), men serligi stuðulin frá Danmark hevjar metingina eitt stig upp á Aa2. Um man roknar við, at stuðulin hvørvur orsakað av ríkisrættarligu broytingini, so vil tað sambært hesum siga, at metingin hjá Føroyum fellir eitt stig ("notch") í virði – frá Aa2 til Aa3.

Hvussu stórt er hetta fallið í grundini? Tað síggja vit við at hyggja at almenna metingar-stiganum hjá Moody's. Her sæst, at Aa3 er lægsta meting í sonevnda Aa-bólkinum – beint undir Aa2 og Aa1. Yvirhøvur verða allar metingar í Aa-bólkinum mettar sum góðar. Moody's lýsir bólkin sum "High quality and very low credit risk."

Eisini er vert at hava fyri eyga, at tær ymsu metingarnar eru deildar upp í nakrar breiðari góðsku-flokkar, nevndar grades. Íleggjarar hyggja serliga at hesum flokkum í sambandi við lánveiting.

Bæði Aa2 og Aa3 liggja í High Grade, sum er næstbesti flokkurin (sí yvirlit á síðu 57).

At fara frá Aa2 til Aa3 er sostatt ikki eitt skift í flokki. Tað er bert eitt stig ("notch") lægri innan fyri sama grundleggjandi góðsku-flokk, High Grade. Tað vil siga, at sjálvt um metingin hjá Føroyum fellir til Aa3, so eru vit framvegis nógv trin frá, at tað bilar nakað stórvegis. Tí lond í hesum flokki verða enn mett sum álítandi lántakarar.

Dømi um onnur lond við Aa3 meting eru Frakland, Belgia, Írland og Stórabretland.

Tað er trupult at siga neyvt, hvat niðurgraderingin kann fara at merkja fyri sjálva lánsrentuna. Ein niðurgradering frá Aa2 til Aa3 ávirkar sannlíkt rentuna nakað, men í avmarkaðan mun. Sambært meting hjá danska bankanum Nordea kann talan verða um eina rentuøking á millum 0,10 og 0,15 prosentstig.

Havast skal í huga, at rentan hjá einum landi ikki bara verður ávirkað av kredittmetingini, men eisini nógvum øðrum viðurskiftum. Metingarnar byggja á eina fyritreyt um eina skipaða og støðuga broyting av

ríkisfelagsskapinum, har Føroyar framhaldandi brúka donsku krónuna sum valuta. Út frá hesum verður ein møgulig ávirkan á rentuna á millum 0,10 og 0,15 stig mett at vera avmarkað.

Havast skal eisini í huga, at fáa Føroyar betri handilsavtalur í eini nýggjari skipan, fer tað uttan iva at hava positiva ávirkan á ratingina.

## Viðmerking frá Landsbankanum:

"Moody's hevur 23 ratingstig. Føroyar hava ta triðhægstu metingina Aa2. Tá man hevur so høga kreditmeting, kostar ein niðurrating ikki so nógv. Men fyri hvørt stig lántakarin verður niðurrataður, veksur tað hann skal rinda í meirrentu."

Kredittmetingin hjá Moody's av Føroyum verður í dag gjørd við einum háttalági, sum er ment til ikkisuveren lond. Um Føroyar verða ein statur, so verður kredittmetingin gjørd við einum øðrum háttalági, sum Moody's brúkar til sjálvstøðug lond. Landsbankin hevur ongar royndir við, hvussu sjálvstøðug lond vera kredittmett, og tí ber ikki til at siga nágreiniliga, hvat kreditmetingin verður samanborið við í dag. Tí má hendan meting takast við fyrivarni.

| Moody's | | S&P | | Fitch | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Long-term** | **Short-term** | **Long-term** | **Short-term** | **Long-term** | **Short-term** | **Rating description** |
| Aaa | P-1 | AAA | A- 1+ | AAA | F1+ | Prime |
| Aa1 | | AA+ | | AA+ | | High grade |
| Aa2 | | AA | | AA | | |
| Aa3 | | AA- | | AA- | | |
| A1 | | A+ | A- 1 | A+ | F1 | Upper medium grade |
| A2 | | A | | A | | |
| A3 | P-2 | A- | A- 2 | A- | F2 | |
| Baa1 | | BBB+ | | BBB+ | | Lower medium grade |
| Baa2 | P-3 | BBB | A- 3 | BBB | F3 | |
| Baa3 | | BBB- | | BBB- | | |
| Ba1 | Not Prime | BB+ | B | BB+ | B | Non-investment grade speculative |
| Ba2 | | BB | | BB | | |
| Ba3 | | BB- | | BB- | | |
| B1 | | B+ | | B+ | | Highly speculative |
| B2 | | B | | B | | |
| B3 | | B- | | B- | | |
| Caa1 | | CCC+ | C | CCC+ | C | Substantial risks |
| Caa1 | | CCC | | CCC | | |
| Caa1 | | CCC- | | CCC- | | |
| Ca | | CC | | CC | | Extremely speculative |
| | | C | | C | | Default imminent |
| C | | RD | D | DDD | D | In default |
| / | | SD | | DD | | |
| / | | D | | D | | |

# Ítøkilig fremjan

**Seinasti parturin av hesum uppskotinum er eitt boð uppá eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu umskipanin í felagsskapinum við Danmark kann fremjast. Tilgondin tekur støði í Stýrisskipan Føroya frá 1994**

## 2.

### Samráðingar við Danmark á stjórnarstigi

Av tí at samráðingarnar eru á stjórnarstigi, verður tað landsstýrið, sum umboðar Føroyar mótvegis Danmark. Sambært stýrisskipanini §54 stk. 2. skal landsstýrið ráðføra seg við løgtingsins uttanlandsnevnd í sambandi við samráðingar við ríkismynduleikarnar, sum hava stóran týdning fyri viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Samráðingarnar skulu føra til eitt ítøkiligt boð upp á nýggja felagsskapin millum londini.

### Løgtingssamtykt

Fyrsti liður í tilgongdini er, at Løgtingið samtykkir at geva landsstýrinum heimild at taka upp samráðingar við donsku stjórnina. Hóast ein slík avgerð enn ikki er tikin, tekur ein greiður meirluti av politisku flokkunum í Føroyum undir við hesum.

## 1.

## 4.

### Løgtingssamtykt við nýggjum løgtingi

Seinasta stigið, áðrenn nýggja skipanin formliga verður samtykt í Føroyum, er ein løgtingsavgerð afturat eftir næsta løgtingsval. Hóast hvørki fólkarættur ella stýrisskipanarlógin áseta hetta kravið, meta vit, at hendan broytingin er á støði við eina broyting í stýrisskipanini, og tí skal avgerðin samtykkjast av tveimum ymiskum løgtingum. Hetta tryggjar eisini nýggju skipanini legitimitet.

### Fólkaatkvøða í Føroyum

Úrslitið av samráðingunum millum londini skal leggjast til fólkaatkvøðu í Føroyum. Stýrisskipanin ásetur ikki nakað krav um fólkaatkvøðu, og sambært fólkarættinum eru eingi løgfrøðilig krøv um fólkaatkvøðu, men hetta hevur í praksis verið siðvenja, tá ið lond skipa seg sjálvstøðugt. Hetta er eisini neyðugt fyri at tryggja nýggju skipanini legitimitet.

## 3.

Í stuttum leggur uppskotið upp til eina breitt politiskt haldføra loysn, har bæði sambands- og loysingarvongur geva seg nakað, men eisini vinna.

# SAMAN-DRÁTTUR

Henda frágreiðing viðger spurningin um ríkisrættarligu støðu Føroya og setir fram eitt uppskot um eina dagførda skipan, har Føroyar gerast ein sjálvstøðug tjóð í ríkja-felagssksapi við Danmark. Endamálið er ikki ideologiskt, men pragmatiskt: at tryggja Føroyum størri uttanríkispolitiskar møguleikar og betri atgongd til altjóða samstarv, samstundis sum ein tættur felagsskapur við Danmark verður varðveittur.

Síðan heimastýrislógin kom í gildi í 1948, hava Føroyar stigvíst yvirtikið fleiri og fleiri málsøki. Men seinastu árini hevur verið greitt, at verandi ríkisrættarligi karmurin er vorðin ov trongur. Føroyar kunnu ikki gerast fullgildir limir í fleiri týðandi altjóða felagsskapum - so sum EFTA, IOC og ymiskum fiskivinnufelagsskapum - tí Føroyar ikki eru ein statur. Hetta forðar fyri føroyskum vinnuligum, mentanarligum og politiskum áhugamálum.

Frágreiðingin vísir á, at hóast Føroyar hava víðar uttanríkispolitiskar heimildir í dag, eru hesar bundnar av danska eindarstatinum. Galdandi skipanir millum Danmark, Føroyar og Grønland skapa trupuleikar í praksis, millum annað tí áhugamálini hjá londunum ikki altíð samsvara. Tí verður mett, at ein grundleggjandi dagføring av ríkisfelagsskapinum er neyðug.

Loysnin, sum verður løgd fram, er at skipa Føroyar sum sjálvstøðugan stat í ríkjafelagsskapi við Danmark, sambært ST-góðkendum leisti. Hetta byggir á altjóða fordømi, serliga Marshalloyggjarnar, Mikronesia og Palau, sum eru sjálvstøðug lond, men hava langtíðarsáttmálar við USA. Ein slík skipan gevur Føroyum fulla altjóða viðurkenning, samstundis sum Danmark framhaldandi umsitur ávís øki.

Kjarnin í uppskotinum er øvug delegatión: Føroyar yvirtaka øll málsøki sum statur, men lata síðani Danmark umsita ávís øki. Uttanríkispolitikkurin skal vera á føroyskum hondum, meðan verju- og trygdarpolitikkur, hægstirættur, ríkisyvirhøvur umframt gjaldoyra- og peningapolitikkur verða verandi donsk málsøki í ásett áramál eftir sáttmála. Fíggjarøkið, útlendingaøkið, rættarøkið, politi og kriminalforsorg verða somuleiðis verandi donsk málsøki, men kunnu yvirtakast á sama hátt sum í dag. Føroyar skulu hava egnan ríkisborgararætt, men við møguleika fyri dupultum ríkisborgararætti. Gerandisdagurin hjá borgarunum broytist lítið. Føroyar verða framvegis undir donsku verjuni og NATO, danska krónan verður varðveitt, kongur verður ríkisyvirhøvur, og rættindi innan eitt nú heilsu og útbúgving skulu tryggjast gjøgnum sáttmálar og norðurlendskt samstarv.

Búskaparliga verður mett, at hvørki ríkisveiting, kredittmeting ella rentustøði nýtast at broytast stórvegis. Ein møgulig niðurgongd í kredittmetingini verður mett sum avmarkað. Altjóða fordømi vísa eisini, at fíggjarligur stuðul kann halda fram, hóast fulla sjálvstøðu. Og so kann betri marknaðaratgongd eisini styrkja búskapin.

Í stuttum leggur uppskotið upp til eina breitt politiskt haldføra loysn, har bæði sambands- og loysingarvongur geva seg nakað, men eisini vinna. Føroyar fáa altjóða sjálvræði og sterkari rødd, meðan tætt samstarv við Danmark verður varðveitt. Loysnin er pragmatisk og tíðarhóskandi – men krevur breiða fólksliga og politiska undirtøku.

■



# KELDUR


[1] **Frá bókini "LØGTINGIÐ 150" s. 294**

[2] **Heimastýrislógin (1948)**

[3] **EU Reporter Correspondent (2014). EU Herring dispute: EU lifts measures against Faroe Islands** https://www.eureporter.co/frontpage/2014/08/18/herring-dispute-eu-lifts-measures-against-faroe-islands/?utm.com

[4] **European Union External Action (2024). The European Union and the Faroe Islands** https://www.eeas.europa.eu/eeas/european-union-and-faroe-islands_en

[5] **Skaale, Sjúrður (2016). 2000- Tá Føroyar skuldu loysa, s.29**

[6] **Lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera (2005)**

[7] **Lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka (2005)**

[8] **Statsministeriet (2023): Statsministerens tale ved Folketingets åbning den 3. oktober 2023.** https://stm.dk/statsministeren/taler/statsministerens-tale-ved-folketingets-aabning-den-3-oktober-2023/

[9] **Statsministeriet (2025): Statsminister Mette Frederiksens tale ved Folketingets åbning den 7. oktober 2025.** https://stm.dk/statsministeren/taler/statsminister-mette-frederiksens-tale-ved-folketingets-aabning-den-7-oktober-2025/

[10] **Hezel, Francis. Trust Territory of the Pacific Islands** https://www.britannica.com/place/Trust-Territory-of-the-Pacific-Islands

[11] **Domenech, Douglas (2019). Freely Associated States** https://www.doi.gov/ocl/freely-associated-states?utm.com

[12] **Economic Impact of the Compact and Renewal on the Republic of Palau (2023)** https://www.pitiviti.org/pitiviti.org/public/storage/dm/2023/06/adb-palau-countryfocus-may2023-digital-20230609022330965.pdf?utm.com

[13] **Ibid**

[14] **Føroya Landsstýri (1999). Hvítabók, s.64**

[15] **United Nations. Member States** https://www.un.org/en/about-us/member-states?utm.com

[16] **Føroya Landsstýri (1999). Hvítabók, s.63**

[17] **Ibid s.62**

[18] **Agence France-Presse (2025). France, New Caledonia reach 'historic' statehood deal; citizens to remain French** https://www.scmp.com/news/world/europe/article/3317992/france-new-caledonia-reach-historic-statehood-deal-citizens-remain-french?utm.com

[19] **The Guardian (2023). Macron in New Caledonia: why is the territory divided and will it break away from France?** https://www.theguardian.com/world/2023/jul/24/emmanuel-macron-new-caledonia-trip-will-it-break-away-independence-referendum?utm.com

[20] **United Nations General Assembly Resolution 1541 (XV) (1960)**

[21] **Svar frá bretsku løgmálaráðfrúðuni 4 September 2025** https://questions-statements.parliament.uk/written-questions/detail/2025-09-04/75132/?utm.com

[22] **Local Voting Rights for EU Citizens Living in the UK (2021)**
https://www.gov.uk/government/publications/local-voting-rights-for-eu-citizens-living-in-the-uk/local-voting-rights-for-eu-citizens-living-in-the-uk?utm_source=chatgpt.com

[23] **Department of the Interior – Office of Insular Affairs – Freely Associated States Factsheet**
https://www.doi.gov/oia/freely-associated-states

[24] **Tupuola, Jared G. (2025). The Compacts of Free Association**
https://www.congress.gov/crs-product/IF12194?utm.com

[25] **Sameindu Tjóðir. Unric.org. FN Pagten.**
https://unric.org/da/fn-pagten

[26] **Sameindu Tjóðir. UN.org. About UN Membership.**
https://www.un.org/en/about-us/about-un-membership

[27] **Uttanríkisráðið. Uttanríkispolitikkur. Norðurlandasamstarv.**
https://www.ummr.fo/fo/arbeidsoeki/uttanrikisvidurskifti/nordurlandasamstarv

[28] **Uttanríkisráðið. Uttanríkispolitikkur. Arktis.**
https://www.ummr.fo/fo/arbeidsoeki/uttanrikisvidurskifti/arktis

[29] **Løgting (2015). Svar upp á fyrispurning nr. 101/2014.**
https://www.logting.fo/files/casewrittenquestion/525/101.14%20Svar%20fra%20B.Kalsoe%20til%20J.Rein%20-%20Eurovision-Song-Contest.pdf

[30] **Jensen, F. (2024). Fíggjarstøðan í KVF ein forðing fyri EBU-limaskapi. Kringvarp Føroya.**
https://kvf.fo/netvarp/sv/2024/02/16/figgjarstodan-i-kvf-ein-fording-fyri-ebu-limaskapi

[31] **Føroya Landsstýri (1999). Hvítabók, s.47.**

[32] **Danmarks Statistik. Personer født på Færøerne og bosat i Danmark 1. januar efter køn, alder og forældrenes fødested.**
https://www.statistikbanken.dk/BEF5F

[33] **Kringvarp Føroya (2024) Kanst tú siga farvæl? (1:2).**
https://kvf.fo/sjon/sending/kanst-tu-siga-farvael?sid=184255

[34] **Hagstova Føroya. Føðiland.**
https://hagstova.fo/fo/folk/folkatal/fodiland

[35] **Lindenskov, Eirikur (2025). Hava brúkt 2,5 mia kr til sjúkrahúsviðgerð uttanlands.**
https://in.fo/news-detail/hava-brukt-26-mia-kr-til-sjukravidgerd-uttanlands

[36] **Studni. Hagtøl yvir hægri lestur í Føroyum og uttanlands.**
https://www.studni.fo/hagtoel

[37] **Nordisk Samarbejde. Overenskomst mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om adgang til videregående uddannelse.**
https://www.norden.org/da/declaration/overenskomst-mellem-danmark-finland-island-norge-og-sverige-om-adgang-til-videregaaende

[38] **Studni. Stuðul uttanlands.**
https://www.studni.fo/lesandi-uttanlands

[39] **Hagstova Føroya. Inn- og útflutningur skiftur á BEC-vørubólkar og land (1988-2024)**
https://statbank.hagstova.fo/pxweb/fo/H2/H2__UH__UH01/uh_bec.px/

[40] **Landsbankin (2025). Moody’s Rating: Government of Faroe Islands (Denmark).**
https://www.landsbankin.fo/Files/Images/Gjaldf%C3%B8ri%20og%20skuld/Rating/Credit_Opinion-Government-of-Faroe-Islands-29Sep2025-PBC_1454266.pdf

[41] **Landsbankin. Rating.**
https://www.landsbankin.fo/en-gb/liquidity-and-debt/debt/rating

JAF.FO